Syng við gleði fyri Jehova

SANGTEKSTIR

Syng við gleði fyri Jehova

– 1. Krønikubók 15:16

SANGTEKSTIR

Navn

Samkoma

Henda útgávan er ikki til sølu. Hon er framleidd sum liður í einum heimsumfatandi bíbliuundirvísingararbeiði, ið verður fíggjað við sjálvbodnum stuðli.

Um tú vilt lata stuðul, kanst tú fara inn á donate.jw.org.

Syng við gleði fyri Jehova – sangtekstir
"Sing Out Joyfully" to Jehovah—Lyrics Only
Prentað í september 2020

Faroese (*sjjyls*-FR)

© 2017
Watch Tower Bible and Tract Society of Pennsylvania

Útgevarar:
Jehova vitni

sjjyls-FR
200917

Evnisyvirlit

Jehova	1-12
Jesus/loysigjaldið	13-20
Guds ríki	21-24
Tey salvaðu og hin seyðurin	25-27
Sambandið við Jehova	28-40
Bøn	41-47
Vígsla	48-52
Boðanin	53-84
Møtini	85-93
Bíblian	94-98
Brøðralagið	99-103
Kristnir eginleikar	104-130
Familja/vinir	131-138
Vónin	139-147
Frelsa/uppreisnin	148-151

1 *Eginleikar Jehova*

(Opinberingin 4:11)

1. Jehova, tú ert hin alvaldi Gud,
   tú gavst okkum lív og í vónini lut.
   Títt handaverk, góði faðir, er gott
   og vitnar í ævir um tín mátt.

2. Alt hásæti títt er grundað á rætt,
   at virða títt boð fellir eyðmjúkum lætt.
   Vit lesa orð títt og skilja títt verk,
   tín vísdómur, Gud, ger okkum sterk.

3. Tó kærleikin ber av øllum, tú gav,
   við honum fæst lív, honum oysa vit av.
   Við gleði vísa vit øðrum tín veg
   og æra tað navn, ið lýsir teg.

(Les eisini Slm. 36:10; 145:6-13; Præd. 3:14; Ják. 1:17.)

2 *Jehova eitur tú*

(Sálmur 83:19)

1. Tú ert hin sanni Gud,
alt skapti tú við hegni,
gav sólina og regnið
– Jehova eitur tú.
At hoyra til títt fólk,
ta samkomu, tú eigur,
av sonnum er ein heiður,
tí takka vit tær nú.

(NIÐURLAG)

Jehova, Jehova,
bert tú ert sannur Gud,
eingin annar er í himli,
ei heldur her á jørð.
Um títt veldi og tín heiður
fer boð um fjall og fjørð.
Jehova, Jehova,
vit hava ongan annan Gud.

2. Tú evnar okkum til
at verða alt, tú krevur,
ja, ævigt vald tú hevur
– Jehova eitur tú.
Sum vitni tíni nevnd
vit bera navnið fegin,
tú vísir okkum vegin,
og heiðurin fært tú.

(Niðurlag)

(Les eisini 2. Krøn. 6:14; Slm. 72:19; Es. 42:8.)

3 *Tú ert styrkin og vónin, vit líta á*

(Orðtøkini 14:26)

1. Gud Jehova, tú gavst vónina,
sum er so dýrabar.
Gævi øll tí góvu gætur
og fingu skjól hjá tær.
Men av lívsins mongu stúranum
so kann lívið skifta dám,
og tann vón, ið skein so fagurt,
í huganum gerst kám.

(NIÐURLAG)

Tú ert styrkin og vónin,
vit líta á,
tú nøktar alt trot, allan tørv.
Tá vit boða um teg,
er tín andi hjá,
og tá kunnu vit vitna djørv.

2. Hygg í hjørtuni, Jehova Gud,
minn altíð okkum á,
at vit mangan høvdu løtur,
har tú gavst troyst og ráð.
Tá er lætt at styrkja vónina,
kveikja lív, har kólnað er,
fáa mót at bera navn títt
og prísa tíni gerð.

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 72:13, 14; Orðt. 3:5, 6, 26; Jer. 17:7.)

4 *Jehova er hirði mín*

(Sálmur 23)

1. Jehova Gud er mín hirði,
hann vísir mær lívsins veg.
Til grønar eingir og hvíldarvøtn
hann eymliga leiðir meg.
Øll hjartans ynski hann kennir
og skilur, hvat neyðugt er.
Ja, í ríkum kærleika hirði mín
í favninum lamb sítt ber.
Í ríkum kærleika hirði mín
í favninum lamb sítt ber.

2. Á gøtum tínum í rættferð
eg trívist og mennist væl.
Gud, ansa mær, at eg ongantíð
av leiðini villast skal.
Í dimmum dølum, í skugga,
eg gangi og óttist ei,
tí, mín Gud og vinur, tú uggar meg
og beinir við stavi leið.
Mín Gud og vinur, tú uggar meg
og beinir við stavi leið.

3. Jehova, tú ert mín hirði,
tú vísir mær lívsins veg.
Mær fattast einki, eg kenni frið,
og andi tín lívgar meg.
So víst og satt sum tú livir,
so líti eg, Gud, á teg,
og av øllum hjartanum vóni eg,
tú altíð vilt elska meg.
Av øllum hjartanum vóni eg,
tú altíð vilt elska meg.

(Les eisini Slm. 28:9; 80:2.)

5 *Undurfullu verk Guds*

(Sálmur 139)

1. Á Gud, tú skoðar alt, eg geri,
veitst, nær eg leggist, nær eg rakni við.
Tú skilur meg og kennir væl mítt lyndi,
hvar enn eg fari, faðir,
kennir tú hvørt stig.

Tú fylgdi mær í móðurlívi,
har fyri mannaeygum alt var dult,
í tíni bók tað gjølliga var skrivað,
alt, ið tú skapti,
er mær sera undurfult.

Tín vitska, Gud, er stór og vekur undran,
tú veitst um alt og ert mær altíð nær.
Um eg í sorgarmyrkrinum var vilstur,
so hevði andi tín meg funnið har.

Hvar skuldi eg meg fjalt, Jehova,
hvar er tað stað, títt eyga ikki sær?
Eg fann tað ei í hæddum, ei í dýpdum,
tí sjálvt í grøvini
títt eyga við meg bar.

(Les eisini Slm. 66:3; 94:19; Jer. 17:10.)

6 *Himmalin kunnger dýrd Guds*

(Sálmur 19)

1. Jehova dýrd á himlinum er kunngjørd,
   tað, hond Guds hevur skapt,
   er stórt og vekur ans.
   Hvør dagur ber sínum skapara prís,
   og náttarhválvið stjørnuklárt
   ger vart við megi hans.

2. Jehova lóg er lýtaleys og lívgar,
   og vísdóm fáa øll,
   sum boð Guds hava lært.
   Hann dømir rætt, talar sannleikans orð,
   sum leska tann, ið tystur er,
   og gera eygað bjart.

3. At óttast Gud er reint og gott um ævir,
   og dýrari enn gull
   í mongdum er Guds lóg.
   Jehova leiðir sum hirðin sín hóp,
   hann savnar okkum um sítt navn,
   sum er ein verja góð.

(Les eisini Slm. 111:9; 145:5; Opinb. 4:11.)

7 *Jehova er styrki okkara*

(Esaias 12:2)

1. Stóri Jehova, hoyr fagnaðarróp,
tú tókst í favn henda vaksandi hóp.
Vit eru vitni, ið tala um teg,
øll fáa boð, kunnu velja tín veg.

(NIÐURLAG)
Jehova, tú ert í gleði og sorg
okkara styrki, skjøldur og borg.
Trygg tí vit leita í skýlið hjá tær,
stóri Jehova Gud, ver okkum nær!

2. Ljósið frá tær gevur gleði og vón,
einfaldur fatar, og blindur fær sjón.
Ríkið er stovnað, tað sanna vit glað,
tæna tí trúføst hvønn einasta dag.

(Niðurlag)

3. Faðir, tín vilji er okkara lóg,
tú ert mót Satan ein verja so góð.
Freistar hann, ert tú við andanum nær,
hjálpir, so vit standa trúgv móti tær.

(Niðurlag)

(Les eisini 2. Sám. 22:3; Slm. 18:3; Es. 43:12.)

8 *Jehova er verja okkara*

(Sálmur 91)

1. Jehova Gud er verja,
og hann vit líta á.
Í skugga hans er skýli,
har er hann okkum hjá.
Hann lovar tær at rudda veg,
so einki ilt skal nema teg.
Jehova er tann rókin,
tú í vanda bjargar tær á.

2. Um túsund rundan um teg
øll falla, halt tú á!
Gud styrkir tey, sum eyðmjúk
hjá honum søkja ráð.
Tú veitst, hann vakir yvir tær,
um hjartað hart og bangið slær.
Í trongdum gjørdist skilligt,
at tú undir Guds veingjum lá.

3. Gud verjir síni trúgvu,
hann skoðar stórt og smátt,
sær pílarnar á degi
og ræðslurnar á nátt.
Hjá honum lívd og friður er,
hann skapar trygd á tíni ferð.
Jehova veitir frelsu,
alt, hann gevur okkum, er gott.

(Les eisini Slm. 97:10; 121:3, 5; Es. 52:12.)

9 *Jehova er kongur okkara*

(Sálmur 97:1)

1. Jehova eigur tign og heiður,
   hoyrið himlanna kvæði um rættferð hans.
   Mannið kór, hevjið røddir í sangi til Gud,
   gevið Harrans stóru verkum ans.

(NIÐURLAG)

Syngið, himmal og jørð! Fegnist, heiðar og fjøll,
hægsti kongur er Jehova Gud!
Syngið, himmal og jørð! Fegnist, heiðar og fjøll,
hægsti kongur er Jehova Gud!

2. Guds dýrd skal kunnast øllum tjóðum,
   tí hann frelsti og bar okkum dag um dag.
   Hann er ævinnar kongur og alvaldur Gud,
   fyri trónu hans vit savnast glað.

(Niðurlag)

3. Gud festi ríki sítt við rætti,
   krýndi salvaða sonin til ríkisdrott.
   Allir avgudar hokna og verða til spott,
   tí Jehova eigur allan mátt.

(Niðurlag)

(Les eisini 1. Krøn. 16:9; Slm. 68:21; 97:6, 7.)

10 *Prísið Jehova, Gudi okkara!*

(Sálmur 145:12)

1. Syngið øll um Jehova Gud.
   Gerið kunnigt hansara navn.
   Rópið hart, dagur Guds er nær,
   nú er lív og bjarging fyri stavn.
   Hin frumborni Guds fær ríkið í arv,
   hann skal døma og ráða rætt.
   At vón er um frið skal kunngerast nú,
   inntil øll hava boðið frætt.

   (NIÐURLAG)

   Syngið øll um Jehova Gud!
   Hann er verdur heiður, prís og dýrd!

2. Syngið øll um Jehova Gud.
   Um hans dýra navn kvøðið glað.
   Og við tøkk, hjartans stóru tøkk,
   prísa vit Guds verkum dag um dag.
   Tí hann, sum í veldi bergtekur øll,
   gevur tó sínum smáu ans,
   og tolin hann hoyrir tænarans bøn,
   tann, ið biður um miskunn hans.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 89:28; 105:1; Jer. 33:11.)

11 *Skapanarverkið ber Gudi prís*

(Sálmur 19)

1. Jehova, alt, tú fremur, prísar tær,
   tað speglar tign og vitsku víða hvar.
   Títt handaverk á jørð og himli hátt
   ber skilligt boð, Jehova, um tín mátt.
   Títt handaverk á jørð og himli hátt
   ber skilligt boð, Jehova, um tín mátt.

2. At vera vísur er at óttast teg,
   í lýdni ganga, har tú vísir veg.
   Eitt savn við dýrum gripum er tín bók,
   við henni gerast ung og gomul klók.
   Eitt savn við dýrum gripum er tín bók,
   við henni gerast ung og gomul klók.

3. At kenna teg ger lívið ríkt og gott,
   títt orð er ljós á vegnum dag og nátt.
   Og størsti heiðurin av øllum er
   at gera navn títt heilagt her í verð.
   Ja, størsti heiðurin av øllum er
   at gera navn títt heilagt her í verð.

(Les eisini Slm. 12:7; 89:8; 144:3; Róm. 1:20.)

12 *Stóri Gud okkara, Jehova*

(2. Mósebók 34:6, 7)

1. Stóri Jehova, ríkur í miskunn,
   øll tín gerð er røtt og vís,
   tú ert verdur allan prís.
   Kærleikans Gud og vísdómsins kelda,
   vegin fyri okkum lýs.

2. Gott er at kenna umsorgan tína,
   móti tær vit eru smá,
   dust, sum eyga títt tó sá.
   Tolin og blíður hoyrir tú bønir,
   veitir hjálp og hyggin ráð.

3. Skapningur tín skal takksamur syngja
   um tín góða frelsuveg
   og ta dýrd, ið lýsir teg.
   Stóri Jehova, hoyr okkum syngja,
   hjartans fegin prísa tær.

(Les eisini 5. Mós. 32:4; Orðt. 16:12; Matt. 6:10; Opinb. 4:11.)

13 *Kristus er okkara fyrimynd*

(1. Pætursbræv 2:21)

1. Ein kærleiksfyrimynd
var Gud, ið fjaldi synd
og læt sín son vera bót fyri misgerð.
Ja, Kristus gjørdist hold,
varð menniskja á fold,
bar Gudi heiður í orði og gerð.

2. Guds orð var honum breyð,
ein hjálp í sálarneyð,
úr tí fekk Jesus sær vísdóm og innlit.
Hann tænti Gudi fyrst,
var tænari av lyst,
og beint í hansara spor stíga vit.

3. Jehova Gud fær prís,
um vit nú eru vís
og akta Jesus í allari atferð.
Har hann breyt okkum slóð,
vit ganga hugagóð
og vita, Gud altíð við okkum er.

(Les eisini Jóh. 8:29; Ef. 5:2; Fil. 2:5-7.)

14 *Ærið jarðarinnar nýggja kong!*

(Sálmur 2:12)

1. Úr øllum heimsins londum
savnar Kristus stóran skara,
hann sendir síni salvaðu
at boða frá og læra.
Ein gleðirík og vøkur sjón!
Guds ríki, sum er sett á stovn,
ber fólkunum troyst og bjarta vón,
teirra hjartans bøn er svarað.

(NIÐURLAG)

Ærið Gud, Jehova!
Ærið sonin, Kristus!
Konganna kongur er verdur prís.
Honum fagna vit av hjartanum sameind,
standa í trúnni vís.

2. Vit fagna nýggja konginum,
sum hevur tikið ræðið.
Í rættvísi hann dømir øll,
skjótt bøtist allur skaði.
Tá kemur alt, vit stunda á,
tey deyðu rísa, stór og smá,
á foldini rennur lívsins á.
Trívið glað í takkarlagið!

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 2:6; 45:2; Es. 9:6; Jóh. 6:40.)

15 *Prísið øll Guds syni!*

(Opinberingin 11:15)

1. Prísið øll Guds syni,
   sum salvaður er til kong.
   Av røttum skal hann ráða
   og trúfastur signa mong.

   Hann halgar dýra navn Guds,
   sum nú er gjørt til spott;
   tá noyðast øll at sanna,
   Gud eigur allan mátt.

   (NIÐURLAG)
   Prísið øll Guds syni,
   Guds frumborna gevið ans!
   Á Zion fekk hann sæti,
   har byrjaði veldi hans.

2. Prísið øll Guds syni,
   við honum varð svarað bøn;
   hann doyði fyri fólkið
   og tók á seg syndaløn.

   Ein brúður bíðar Kristi
   í hvítum líni prýdd,
   alt ber Jehova æru,
   hann eigur alla vídd.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 2:6; 45:4, 5; Opinb. 19:8.)

16 *Sig takk fyri salvaða kongin*

(Opinberingin 21:2)

1. Gud salvaði Jesus, sín son,
   at stjórna tí víðu verð.
   Hans veldi er grundað á rættferð
   og fremur Guds vilja í gerð.

   (NIÐURLAG)

   Sig takk fyri salvaða kongin,
   syng Jesusi fagnaðarsong!
   Sig takk, Harrans seyður, fjálg er tann rødd,
   ið leiðir um bø og ong.
   Sig takk fyri salvaða kongin,
   Gud gav honum heiður og mátt,
   í ríkinum fekk hann himmalska tign,
   Guds navn skal hann hevja hátt.

2. Sum Jesusar brúður ein tjóð
   er kallað og endurfødd.
   Hon arvar við soninum ríkið,
   við tí verða menniskju grødd.

   (Niðurlag)

(Les eisini Orðt. 29:4; Es. 66:7, 8; Jóh. 10:4; Opinb. 5:9, 10.)

17 *’Tað vil eg’*

(Lukas 5:13)

1. Fúsur Jesus ofraði alt,
   kom menniskjum nær, tá tað galt,
   læt seg lýðin í hold,
   varð mansbarn á fold,
   hann kærleikans veg hevði valt;
   birti vón, har fólk liðu neyð,
   hann grøddi og uggaði tey.
   Tá eitt menniskja eyðmjúkt bað: ’Grød meg,’
   var svarið tí: ’Ja, tað vil eg!’

2. Latið okkum dag fyri dag
   í øllum, vit fáa í lag,
   sýna kærleik sum hann,
   ið lív okkum vann,
   og gera alt, hann okkum bað.
   Faðirleys og einkjur í neyð
   – Gud vil, at vit hugsa um tey.
   Tørvar onkrum ein beina og spyr teg,
   er svarið tá: ’Ja, tað vil eg’?

(Les eisini Jóh. 18:37; Ef. 3:19; Fil. 2:7.)

18 *Vit takka fyri loysigjaldið*

(Lukas 22:20)

1. Jehova, góði Gud,
vit standa fyri tær,
sum av kærleika og miskunn
kom menniskjum nær.
Tín kæra son, hin elskaða,
tú ofraði,
tá loystust deyðans bond, og vit
vórðu sátt við teg.

(NIÐURLAG)

At bjarga okkum doyði hann,
til frelsu dýra blóðið rann.
Takk, Gud, at tann,
ið leitar skjól hjá tær, nú liva kann.

2. Sítt reina lív læt Jesus
fúsur vera gjald,
og við hesi kærleiksgerð
misti deyðin sítt vald.
Vit vóru vilst og illa stødd
í hesi verð,
men Jesus birti vón um
lívið, ið ævigt er.

(Niðurlag)

(Les eisini Hebr. 9:13, 14; 1. Pæt. 1:18, 19.)

19 *Kvøldmáltíð Harrans*

(Matteus 26:26-30)

1. Jehova Gud, faðir í himli,
   tað var hesa heilagu nátt,
   tú fekst frelsu í lag fyri fólk títt, sum bað;
   tú vísti tín kærleik og mátt.
   Eitt lamb varð tá ofrað til frelsu,
   og trælbundna fólkið varð loyst.
   Eftir júst hesi mynd bøtti sonur tín synd;
   hann læt blóð sítt, og vit fingu troyst.

2. Nú ímynda breyðið og vínið
   tað gjaldið, tú gávmildur gav.
   Sonur tín kom til verð, framdi kærleikans gerð,
   hann aktaði teg uttan krav.
   Við takksemi eru vit komin
   at gleðast við minnið um hann,
   sum á deyðanum vann, beindi burt syndabann
   og nú øllum til lív vísa kann.

3. Tú bjóðaði okkum at møtast,
Jehova, vit komu av lyst,
og vit lovprísa tær, sum kom menniskjum nær;
tú sendi til jarðar tín son.
Vit hávirða kvøldmáltíð Harrans,
her styrkir tú hjørtu og sinn,
so vit dag eftir dag kunnu tæna tær glað
og í trúnni á teg standa stinn.

(Les eisini Luk. 22:14-20; 1. Kor. 11:23-26.)

20 *Tú gavst tín kæra son*

(1. Jóhannesarbræv 4:9)

1. Jehova, vit sóu
   í øldir onga vón,
   við gjaldi so dýrum
   vórðu vit tá loyst.
   Vit leggja lívið alt
   í tínar hendur, Gud,
   og siga fegin frá,
   tú veitir vón og troyst.

(NIÐURLAG)

Takk, Gud, vit prísa tær,
tú gavst tín kæra son.
Hann doyði fyri okkum,
av kærleika tú gavst tín son.

2. Við góðsku og miskunn
tú dregur okkum nær.
At læra um navn títt
broytir lív og lag.
Men størst av øllum er
tó kærleiksgáva tín,
vit fingu lívsins vón
og takka tær nú glað.

(Niðurlag)

(ENDI)

Jehova, so takksom vit standa fyri tær,
í góðsku og miskunn, góði Gud, tú gavst tín son.

(Les eisini Jóh. 3:16; 15:13.)

21 *Søkið altíð fyrst Guds ríki!*

(Matteus 6:33)

1. Altíð gleðist Gud um ríkið,
   tað, sum okkum lovað varð.
   Kristus Jesus hevur ræði,
   fremur rættin víða hvar.

   (NIÐURLAG)
   Søkið altíð fyrst Guds ríki,
   søkið rættferð Guds og frið!
   Berið boð um dýrd Jehova,
   tænið trúføst lið um lið!

2. Hví so stúra fyri degnum,
   um vit verða svong og tyst?
   Alt skal gevast okkum umframt,
   bert vit søkja ríkið fyrst.

   (Niðurlag)

3. Farið út til allar tjóðir,
   gevið blindum bjarta sjón,
   lærið øll, at bert Guds ríki
   bjóðar troyst og trygga vón.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 27:14; Matt. 6:34; 10:11, 13; 1. Pæt. 1:21.)

22 *Guds ríki hevur vald!*

(Opinberingin 11:15; 12:10)

1. Jehova, tú ævinnar Gud,
vit prísa tíni gerð.
Í hásætið setti tú Krist
at skipa rættin her.
Títt ríki er í himli føtt,
skjótt er á jørð øll illgerð bøtt.

(NIÐURLAG)

Títt ríki hevur vald,
og frelsu tað menniskjum ber.
Títt ríki hevur vald!
Á Gud, komi ríki títt her!

2. Í himli er fagnaðarróp,
har hoyrist einglakór.
Nú Satan er kastaður út,
er gleðin ovurstór.
Títt ríki er í himli føtt,
skjótt er á jørð øll illgerð bøtt.

(Niðurlag)

3. Skjótt farin er Djevulsins tíð,
og um vit líða neyð,
so vita vit, frelsan er nær,
alt verður, sum tú beyð.
Títt ríki er í himli føtt,
skjótt er á jørð øll illgerð bøtt.

(Niðurlag)

(Les eisini Dán. 2:34, 35; 2. Kor. 4:18.)

23 *Jehova hevur ræðið*

(Opinberingin 11:15)

1. Ríki Guds stjórnar í dag,
konginum prísa vit glað.
Kristus er settur í hásæti hátt.
Savnið tí veldigan hóp,
skerið í fagnaðarróp!
Elskaði sonurin
fekk vald og stjórnarmátt.

(NIÐURLAG)

Hvat hevur ríki Guds at bjóða?
Rættvísi, trygd og sannan frið.
Hvat man Guds ríki hartil bjóða?
Eydnu og lív, ið varir við.
Syngið fyri alheims Harra,
prísið honum lið um lið.

2. Kristus sum stríðshetja brátt
sýnir sín veldiga mátt,
bindur hin ónda og syndrar hans verk.
Tíðin er stutt, boðið frá,
øll skulu hoyra Guds ráð.
Vitnið, so eyðmjúk
fáa trúgv og gerast sterk.

(Niðurlag)

3. Konginum syngja vit prís,
frelsan við honum er vís,
heilaga navn Guds hann trúfastur bar.
Stígið um tempulsins gátt,
tilbiðið Gud dag og nátt,
skjótt fær Guds sonur
harradømi víða hvar.

(Niðurlag)

(Les eisini 2. Sám. 7:22; Dán. 2:44; Opinb. 7:15.)

24 *Komið niðan á fjall Jehova!*

(Esaias 2:2-4)

1. Lítið upp móti ský,
har er fjall Jehova Guds,
grundfest á fjallatindum
hátt á heilagum stað.

Fólk úr allari verð
gerast ferðabúgvin nú,
rópa so hvørt til annað:
’Kom, tæn Gudi í dag!’

Púra greitt er tað sagt,
at hin minsti skal verða til tjóð!
Her og nú savnast fólk,
læra rættferðar leiðir og lóg.

Milliónir á ferð
streyma til hin sanna Gud;
honum, ið øllum valdar,
tæna fólkini glað.

2. Jesus gav okkum boð:
’Farið út og sigið frá,
talið um friðarríkið,
berið boð út í verð.’

Hann er kongurin har,
býður okkum fylgja sær
– eyðmjúk úr øllum ættum
eru longu á ferð.

Ovurglað eru vit,
nú so nógv leggjast til dag um dag,
ja, og øll vitna fús
fyri fólki av ymiskum slag.

’Komið niðan í dag
á Guds fjall,’ vit rópa glað,
’berið Jehova heiður,
vís í orði og gerð.’

(Les eisini Slm. 43:3; 99:9; Es. 60:22; Áps. 16:5.)

25 *Ein serstøk ogn*

(1. Pætursbræv 2:9)

1. Gud hevur salvað synir
   til heilaga, nýggja tjóð,
   sum hann keypti frá foldum
   og til hjarta sítt dró.

   (NIÐURLAG)

   So serstøk er ogn tín,
   hesi fólk, tú tókst í favn.
   Tey prísa tær takksom
   og boða við gleði um títt navn.

2. Sannleikans orð tey læra,
   øll, Gud hevur halgað sær.
   Hann úr myrkri og iva
   inn í ljósið tey bar.

   (Niðurlag)

3. Trúføst í sínum verki
   tey savna inn „annan seyð“,
   fylgja soni Guds eftir,
   fremja alt, sum hann beyð.

   (Niðurlag)

(Les eisini Es. 43:20b, 21; Mal. 3:17; Kol. 1:13.)

26 *Tit gjørdu mær væl*

(Matteus 25:34-40)

1. Jesus frøist um seyð, sum nú støðugt legst til
og við hansara brøðrum samstarva vil.
At so seyðurin ger
hesum salvaðu væl,
sær Jesus sum góðgerð, hann samsýna skal.

(NIÐURLAG)
'Tá tit uggaðu teir, tit uggaðu meg.
Tað, sum tit gjørdu teimum, gjørdu tit mær.
Ein stuðul til teirra var stuðul til mín.
Tá tit hjálptu teimum, hjálptu tit mær.
Tað, sum tit gjørdu teimum, gjørdu tit mær.'

2. 'Eg leið tosta og svongd, ja, mær vantaði alt,
men tit komu og styrktu meg, tá tað galt.'
Um tey ovfarin spyrja:
'Nær gjørdu vit tað?'
skal kongurin svara, og røddin er glað:

(Niðurlag)

3. 'Og tit vitnaðu djørv, framdu íðin mítt verk,
mínum brøðrum tit hjálptu, trúføst og sterk.'
Við sín seyð undir høgru lið
sigur hann tá:
'Eitt paradís, lovi eg, tit skulu fá.'

(Niðurlag)

(Les eisini Orðt. 19:17; Matt. 10:40-42; 2. Tim. 1:16, 17.)

27 *Synir Guds opinberast*

(Rómbrævið 8:19)

1. Skjótt opinberast synir Guds,
og tíðin kemur brátt,
tá teir við Kristi fáa dýrd,
í himli stóran mátt.

(NIÐURLAG)

Skjótt opinberast synir Guds,
teir hevja rættarsvørð
og sigra víst við Kristusi,
um orrustan er hørð.

2. Úr himli hoyrist lúðraljóð,
tað gellir síðstu ferð,
tá kongur konga savnar øll,
ið bíða honum her.

(Niðurlag)

(BRÚGV)

Hygg synir Guds við Kristusi,
teir stríða síðsta stríð.
Í himli verður brúdleyp nú
og gleði alla tíð.

(Niðurlag)

(Les eisini Dán. 2:34, 35; 1. Kor. 15:51, 52; 1. Tess. 4:15-17.)

28 *Hvør er tín vinur, Gud?*

(Sálmur 15)

1. Hvør er tín vinur, Gud?
   Hvør kennir teg so væl?
   Hvør kann í tjaldi tínum fá sess,
   koma við teg á tal?
   Tann, við vil fylgja tær.
   Tann, við tær trúgvur er.
   Tann, við av hjarta elskar títt orð,
   ávøkst so góðan ber.

2. Hvør er tín vinur, Gud?
   Hvør kann tín tokka fá?
   Hvør kemur fyri hásæti títt?
   Hvør kann títt hjarta ná?
   Tann, við vil tala satt,
   elskar títt dýra navn.
   Tann, við við gleði aktar títt orð,
   tekur tú í tín favn.

3. Hoyr mína eymu bøn.
   Ber alla mína sorg.
   Drag tú meg altíð nærri at tær,
   í tína tryggu borg.
   Ver tú mín vinur, Gud.
   Ver hjá mær nátt og dag.
   Aldri eg fái mætari vin,
   sterkari vinalag.

(Les eisini Slm. 139:1; 1. Pæt. 5:6, 7.)

29 *Vit bera navn Guds honum til prís*

(Esaias 43:10-12)

1. Stóri Jehova, tú valdar um ævir,
fremur í kærleika rættferðarlóg.
Vísdómsins upphav og sannleikans kelda,
himmalska fullveldi títt gevur ró.
Vit eru fólk títt og tæna tær fegin,
boða um ríkið, sum er fyri stavn.

(NIÐURLAG)

Dagliga virða vit, faðir, at nevnast
vitni hjá tær og at bera títt navn.

2. Tæna vit sameind í heilagum verki,
styrkja vit friðin og kærleikans bond.
Hvar vit enn eru, vit spegla tín heiður,
tríva í lovsongin víða um lond.
Í tínum navni vit boða, Jehova,
gleðast um tey, sum tú tekur í favn.

(Niðurlag)

(Les eisini 5. Mós. 32:4; Slm. 43:3; Dán. 2:20, 21.)

30 *Faðir mín, Gud mín og vinur mín*

(Hebrearabrævið 6:10)

1. Tíðirnar versna so hvørt,
   lívið, mær hóvar, kann tykjast fjart.
   Tó sigi eg dag um dag:
   ’Mítt lív er dýrabart.’

   (NIÐURLAG)

   Tí Gud man ikki gloyma,
   hann veit til fulnar, eg elski hann.
   Og altíð er hann hjá mær,
   hjá Jehova eg skýli fann.
   Mín stóri Gud, mín faðir,
   hann helt mær uppi við verndarhond.
   Ja, Jehova hevur við meg
   knýtt vinabond.

2. Unglingaár svunnu skjótt,
   elli er byrða, sum kennist tung.
   Vónin í mær er tó sterk,
   og enn er trúgvin ung.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 71:17, 18.)

31 *Liv við Gudi!*

(Mika 6:8)

1. Í lítillæti liva vit
   við Gudi okkara rætt.
   Ja, lít á Jehova, hann er tær nær
   og sigur aldri ósatt.
   Halt fast við sannleikans reina orð
   og skýggja rangan veg.
   Legg tryggur tína hond í Guds,
   lat hann altíð leiða teg.

2. Í heilagleika liva vit
   við Gudi tætt undir lið.
   Í roynd og í freisting styrkir hann teg
   og gleðist um øll framstig.
   Lat altíð tankarnar steðga við
   alt gott og reint og satt,
   tí faðirin er álitið,
   hann kann beina teg á rætt.

3. Í hjartans gleði liva vit
   við Gudi dag fyri dag.
   Ja, liv við Jehova, fá hann til vin,
   eitt samband ríkt og signað!
   Er Gud tín nær, verður hjartað lætt,
   tú ert á røttum veg.
   Tín gleði sæst, tað stendur fast,
   at Jehova eigur teg.

(Les eisini 1. Mós. 5:24; 6:9; Fil. 4:8; 1. Tim. 6:6-8.)

32 *Halt teg til Jehova!*

(2. Mósebók 32:26)

1. Hjørtuni tyngdust, vit vóru í neyð,
lokkað í snerru, tí átrúnin leyg.
Brátt skein í myrkrinum sannleikans ljós,
vísti á lívsæla kós.

(NIÐURLAG)
Halt teg til Jehova, ver tryggur í tí.
Hann lýsir á vegin, har vit verða frí.
Far fúsur og boða um frelsu og sig:
'Nú veksur Guds ríki, øll jørðin fær frið.'

2. Vit standa saman og fremja Guds verk,
boða um ríkið í trúnni so sterk.
Tíðin er komin at velja í dag,
geva Jehova sítt 'ja'.

(Niðurlag)

3. Djevulin hóttir, men vit halda á,
Gud gevur styrki og er okkum hjá.
Um vit í andgletti sýnast so smá,
víkur hann ongantíð frá.

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 94:14; Orðt. 3:5, 6; Hebr. 13:5.)

33 *Kasta byrðu tína á Jehova!*

(Sálmur 55)

1. Góði Gud Jehova, lurta,
góði, lat meg finna teg!
Tú, sum kennir mína angist,
leið meg inn á friðarveg.

(NIÐURLAG)

Kasta byrðuna á Harran,
hann er troyst tín í neyð og stúran.
Gud kann verja teg í ævir,
um tú lítur fast á hann.

2. Hevði eg sum dúgvan veingir,
fleyg eg burt og fann mær grið,
lívd ímóti óndum monnum.
Harri, ver við mína lið.

(Niðurlag)

3. Troystin frá Jehova fløvar,
gevur troyttum sinni ró,
tá er byrðan løtt at bera,
vónin bjørt og leiðin góð.

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 22:6; 31:2-25.)

34 *Eg vil ganga røttu leið*

(Sálmur 26)

1. Gud, kanna meg og royn mítt hjartalag,
   í tína tryggu hond eg leggi nú mín dag.
   Á góði Gud, ger reina mína sál,
   so tú kanst signa meg og hjálpa mær á mál.

   (NIÐURLAG)
   Jehova Gud, mær liggur gøtan greið
   at ganga røttu leið, um ævir fylgja tær!

2. Har syndin býr, eg finni ongan frið,
   og tey, ið elska lygn, eg kennist ikki við.
   Lat ikki meg við óndum lata lív,
   Gud, tá tú revsar tey, eitt friðarskjól mær blív.

   (Niðurlag)

3. Eg veit, hjá tær er allur sannleikin,
   eg elski bústað tín og fari fegin inn
   til altar títt at syngja tær til prís.
   Mín Gud, eg biði teg, á lívsins veg mær vís.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 25:2.)

35 *Dømið um, hvat beinast er!*

(Filippibrævið 1:10)

1. Í hesi tíð er neyðugt at kanna
og skilja, hvatið er satt,
tí tann,ið dugir væl á at skyna,
kann fremja vilja Guds rætt.

(NIÐURLAG)

Hatið alt ilt, elskið alt gott,
stórt ella smátt,
Gud signar okkara lív, um vit glað
dag fyri dag
læra at døma, hvat beinast er.

2. Hvat hava vit í huganum fremri
enn ganga boð fyri Gud,
so tann,ið ivast, sannleikan lærir
og fær í vónini lut?

(Niðurlag)

3. Ja, gera vit nú tað, sum er beinast,
og halda á uttan slit,
so gevur Gud tann lívsæla friðin,
ið stígur upp um alt vit.

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 97:10; Jóh. 21:15-17; Fil. 4:7.)

36 *Varða hjartað!*

(Orðtøkini 4:23)

1. Vit varða hjartað, ansa tí
og vísa burtur synd.
Gud lesur hjørtu, finnur har
ta instu, sonnu mynd.
Er hjartað stundum svikaligt,
má skilið siga frá
og gera vart við gøtuna,
vit skulu ganga á.

2. Av heilum hjarta biðja vit
Jehova Gud um ráð
og siga fyri honum alt,
øll ynski, alla trá.
Guds vilja meta vit sum lóg
og tæna honum glað.
Í tøkk til Gud vit ala fram
eitt trúlynt hjartalag.

3. Vit seta vakt við hjartans dyr
og steingja úti ilt.
Guds orð, sum gevur nýggjan mátt,
ger stúrið hjarta stilt.
Tey trúgvu eiga tokka Guds
og søkja hann hvønn dag,
tí hjartareinum bjóðar hann
eitt ævigt vinalag.

(Les eisini Slm. 34:2; Fil. 4:8; 1. Pæt. 3:4.)

37 *Eg vil tæna Jehova av allari sál míni*

(Matteus 22:37)

1. Stóri Gud, ið valdar øllum,
tú legði vegin, eg havi valt.
Lat meg tæna tær, Jehova,
gávur og lív – eg vígi tær alt!
Verdur ert tú álit og lýdni,
øll tín lóg er sál míni kær.

(NIÐURLAG)

Lat meg tæna tær, Jehova.
Sál mína alla vígi eg tær.

2. Máni, sól og stjørnuhópar
heiðra á høgum himli títt navn.
Lat meg roynast líka trúgvur,
boða, at frelsan er fyri stavn.
Lyfti míni, Gud, skal eg halda,
trúfast lyndi leggja mær nær.

(Niðurlag)

(Les eisini 5. Mós. 6:15; Slm. 40:9; 113:1-3; Præd. 5:3; Jóh. 4:34.)

38 *Hann skal styrkja teg*

(1. Pætursbræv 5:10)

1. Hví mundi himna Gud á sinni leggja í
at kalla teg úr myrkrinum í ljós?
Títt hjartalag hann sá, tær longdist illa tá
at kenna hann og ganga røttu kós.
Tú vildi gera vilja Guds og bað,
hann hjálpti tá, hann hjálpir enn í dag.

(NIÐURLAG)

Jehova hevur keypt teg,
læt son sín ofra seg,
tí minnist hann til tín,
og hann skal styrkja teg.
Hann leiðir teg sum altíð,
goymir æviga løn.
Ja, hann skal styrkja teg,
hann hoyrir tína bøn.

2. Sín kæra son gav Gud Jehova fyri teg,
hann hjálpir tær at ganga lívsins veg.
Og læt nú Gud eitt gjald so dýrabart og stórt,
so veitst tú, at hann altíð styrkir teg.
Hann gloymir ikki alt, tú gjørdi væl,
á øllum sínum kæru veit hann tal.

(Niðurlag)

(Les eisini Róm. 8:32; 14:8, 9; Hebr. 6:10; 1. Pæt. 2:9.)

39 *Fá tær gott navn hjá Gudi*

(Prædikarin 7:1)

1. Vit royna alsamt at nýta høvi til
   at fáa navn, sum Gud fegin minnast vil.
   Jehova dámar tann, ið íðin søkir hann
   og altíð gleðist um sannleikan.

2. At søkja frama í hesi óndu verð
   gerst lætt ein vágin og vandamikil ferð.
   At fáa vinalag av ivasomum slag
   og Gud til óvin, hvat nyttar tað?

3. Jehova minnist í allar ævir tann,
   sum stendur stinnur í síni trúgv á hann.
   Gud kanst tú líta á, tak til tín hyggin ráð,
   gott verður navnið, tú vinnur tá.

(Les eisini 1. Mós. 11:4; Orðt. 22:1; Mal. 3:16; Opinb. 20:15.)

40 *Hvønn harra hevur tú?*

(Rómbrævið 14:8)

1. Hvønn harra hevur tú?
   Hvønn valdi tú tær til gud?
   Tí harra og gud tín aktar tú,
   hann valdar tínum lívi nú.
   Og kemur tær til hugs
   at dyrka og akta tveir,
   um fegin tú vil, so ber ikki til,
   tí annan virðir tú meir.

2. Hvønn harra hevur tú?
   Hvønn valdi tú tær til gud?
   Bert ein Gud er til, sum eigur tign,
   hví trúgva søgnum, virða lygn?
   Fær verðin trúskap tín
   og loyvi at eiga teg?
   Far heldur til hann, ið beina teg kann
   á lívsins æviga veg.

3. Hvønn harra havi eg?
   Eg hoyri Jehova til.
   Mín faðir í himli eigur meg,
   og honum eina tæni eg.
   Hann keypti meg so dýrt,
   og honum eg verði hjá.
   Mín Gud er mítt alt, hann havi eg valt,
   Jehova líti eg á.

(Les eisini Jos. 24:15; Slm. 116:14, 18; 2. Tim. 2:19.)

41 *Hoyr mína bøn*

(Sálmur 54)

1. Faðir, sum býr í himlinum hátt,
   eg eri tín, tú gevur mær mátt.
   Navn títt at bera, tað er mín løn.

   (NIÐURLAG)
   Stóri Jehova, hoyr mína bøn.

2. Takk, góði Gud, at dagin tú gav,
   sólini beyð at rísa úr hav.
   Miskunn frá tær, Gud, tað er mín løn.

   (Niðurlag)

3. Mær leingist, Gud, at gera alt rætt,
   vís mær tín veg og leið meg á slætt.
   Styrkin frá tær, Gud, tað er mín løn.

   (Niðurlag)

(Les eisini 2. Mós. 22:27; Slm. 106:4; Ják. 5:11.)

42 *Guds tænari biður*

(Efesusbrævið 6:18)

1. Alvaldi Gud og faðir, Jehova,
   gævi títt navn um ævir verður lovað.
   Ætlanir tínar fremur tú lætt.
   Tú beinir burtur óndskap og órætt.
   Alt á foldum gert tú nýtt,
   faðir, komi ríki títt.

2. Takk, góði Gud, tú dagliga gevur
   gávur í mongd, ja alt, ið lívið krevur.
   Skapanarverkið ríkt ber tær rós,
   leikandi lív og skyggjandi dagsljós.
   Tú gavst innlit, vit og skil,
   faðir, tær vit hoyra til.

3. Vit hava trongd, tí trupul er verðin,
   við tína lið er lættari øll ferðin.
   Faðir, vit líta støðugt á teg,
   tú veitst úr øllum royndum ein útveg.
   Altíð ert tú okkum nær,
   vit so fegin fylgja tær.

(Les eisini Slm. 36:10; 50:14; Jóh. 16:33; Ják. 1:5.)

43 *Ein takkarbøn*

(Sálmur 95:2)

1. Stóri Jehova, vit prísa tær takksom,
orða til tín eina eyðmjúka bøn.
Vit hava álit á tær, stóri faðir,
vita, at tú gevur æviga løn.
Dagliga angra vit okkara mistøk,
fyrigev, Harri, at vit eru veik.
Tú hevur loyst okkum, keypt okkum lívið,
takk, at tú hjálpti, tá alt annað sveik.

2. Takk fyri kærleika, takk fyri miskunn.
Takk, at tú dró okkum nærri at tær.
Lær okkum um tínar vegir, tín vilja,
faðir, vit biðja teg, gev okkum far.
Takk, at tú sendi tín máttmikla anda,
gav okkum dirvi at bera títt navn.
Vit skulu tæna tær fús og við gleði,
takk Gud, at tú tekur eyðmjúk í favn.

(Les eisini Slm. 65:3, 5, 12; Fil. 4:6.)

44 *Tann niðurboygdi biður*

(Sálmur 4:2)

1. Við tungum hjarta komi eg,
   Jehova, fyri teg.
   Í djúpum sárum pínir enn,
   og náttin ræðir meg.
   Mín vón er slóknað, mótið sveik,
   eg veit mær eingi ráð.
   Jehova, góði ugga meg
   og lat meg linna fá.

   (NIÐURLAG)
   Hjálp mær, mín Gud, at halda á.
   Fær ivin vald, so ver tú hjá;
   í størstu neyð eg biði teg,
   Jehova Gud, á, vís mær veg.

2. Í orði tínum er mín troyst,
   tað lýsir tína makt
   og teskar fyri meg tey orð,
   eg ikki fái sagt.
   Gud, gev mær trúgv, eg veit,
   tú einki gott mær hevur sýtt;
   tín alskur altíð størri var
   enn neyðars hjarta mítt.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 42:7; 119:28; Róm. 8:26; 2. Kor. 4:16; 1. Jóh. 3:20.)

45 *Hugsanir hjarta míns*

(Sálmur 19:15)

1. Kenn hjartans hugsan mína, Gud,
mítt sinn og alt, ið goymist har.
Eg vil, at alt, sum í mær býr,
skal vera gott og líka tær.
Og fái eg á náttartíð
av kvøl og stúran ongan frið,
lat tankan leita tá til tín
og tað, sum tú vilt kennast við.

2. Alt reint, alt satt og alla dygd,
alt elskuligt, alt gott og rætt,
tað dámliga, sum vinnur rós,
ger sinnið frítt og hjartað lætt.
So dýrabar tín hugsan, Gud,
eg grundi fegin á títt orð.
Fest lógir tínar í mítt sinn,
lær meg at stíga vísdóms spor.

(Les eisini Slm. 49:4; 63:7; 139:17, 23; Fil. 4:7, 8; 1. Tim. 4:15.)

46 *Vit takka tær, Jehova*

(1. Tessalonikabræv 5:18)

1. Vit takka, Jehova, á degi og nátt,
   at sannleikin gav okkum vón og mátt.
   Vit takka, at tú hoyrir eyðmjúka bøn,
   at líta á teg gevur ríka løn.

2. Vit takka, Jehova, at tú sendi troyst,
   við Jesusi vórðu vit endurloyst.
   Vit takka, at tú okkum beinir á veg.
   ’Lat vilja tín verða,’ vit biðja teg.

3. Vit takka, Jehova, tú skapar alt nýtt,
   ein heim, har tað góða kann mennast frítt.
   Vit takka, at vit kunnu boða um teg,
   um navn títt og sannleikans góða veg.

(Les eisini Slm. 50:14; 95:2; 147:7; Kol. 3:15.)

47 *Bið til Jehova hvønn dag*

(1. Tessalonikabræv 5:17)

1. Bið til Jehova, hann hoyrir teg væl,
   fegin hann kemur við okkum á tal.
   Sig honum alt, ið teg órógva man,
   góður í ráðum hann beina tað kann.
   Bið til Jehova hvønn dag.

2. Bið til Jehova og sig honum takk,
   altíð til okkum Guds kærleiki rakk.
   Fyrigev øðrum, í áliti bið,
   tá kann Jehova teg umbera við.
   Bið til Jehova hvønn dag.

3. Bið til Jehova á illgongdum veg,
   kærleikans faðir er góður við teg.
   Leita tær verju, og Gud gevur ráð,
   hann er tann kletturin, vit líta á.
   Bið til Jehova hvønn dag.

(Les eisini Slm. 65:6; Matt. 6:9-13; 26:41; Luk. 18:1.)

48 *Dag um dag liva vit við Jehova*

(Mika 6:8)

1. Dag um dag vit eyðmjúk fylgjast
   við Jehova Gudi hond í hond.
   Hugsa tær ta stóru gávu,
   at hann vil við okkum knýta bond.
   Øllum stendur enn í boði
   frítt at velja hesa leið.
   Glað og fús vit víga Gudi
   orku, evni og æviskeið.

2. Øgilig er Satans vreiði,
   skilligt er, at endin nú er nær.
   Vitni verða hótt og vanvird,
   ofta tykist frelsan okkum fjar.
   Men Jehova Gud kann verja
   tann, ið óttafullur er.
   Latið okkum nærkast honum,
   trúgv og lýðin í orð og gerð.

3. Gud fekk sjálvur hjálp til vega,
   gav sítt orð, sín halga anda við.
   Sína samkomu hann leiðir,
   hoyrir bønir, gevur sálarfrið.
   Tæna vit Jehova trúføst,
   læra vit alt gott og satt,
   so vit kunnu liva eyðmjúk,
   vísa kærleik og gera rætt.

(Les eisini 1. Mós. 5:24; 6:9; 1. Kong. 2:3, 4.)

49 *Gleð hjarta Jehova!*

(Orðtøkini 27:11)

1. Vit lova trúgv at akta teg
og altíð fylgja tínum veg.
Tá vita vit, vit eiga lut
í hjartans gleði tíni, Gud.

2. Tú valdi skilagóðan træl
at tæna fólki tínum væl.
Hann ber í røttu tíð á borð
tann mat, ið gagnast væl, títt orð.

3. Um andi tín er okkum hjá,
so verður tænastan ein trá.
Vit bera ávøkst tær til prís
og gleða hjarta títt sum vís.

(Les eisini Matt. 24:45-47; Luk. 11:13; 22:42.)

50 *Mín vígslubøn*

(Matteus 22:37)

1. Tak mítt hjarta, legg í tað
gott og skynsamt hjartalag.
Tak ta rødd, ið untist mær,
hon skal syngja fyri tær.

2. Tak mín fót, tak hendur við,
gev teim vísdóms mál og mið.
Tak mítt gull, mítt silvur alt,
Harri, tú tað eiga skalt.

3. Tak mítt lív og nýt tað, Gud,
eg skal gleðast um mín lut.
Tak nú meg, so øll mín ferð
altíð tær til vildar er.

(Les eisini Slm. 40:9; Jóh. 8:29; 2. Kor. 10:5.)

51 *Vit víga Jehova alt*

(Matteus 16:24)

1. Jehova til sonin, Jesus Krist, okkum dró,
av kærleika breyt hann okkum slóð.
Frá Guds dýrdartrónu skein
sannleiksglæman klár og rein,
nú lá leiðin okkum bein,
vit fingu trúgv hvør og ein.

(NIÐURLAG)
Vit víga Jehova alt, tað hava vit valt
og vita, hann lønir tað hundraðfalt.

2. Í bøn gjørdu vit Jehova heilagan eið
um lýðin at ganga røttu leið.
Og vit vitna hjartans glað
um Guds ríki, sum ein dag
her á jørð fær frið í lag,
Guds navn ber vissu um tað.

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 43:3; 107:22; Jóh. 6:44.)

52 *Kristin vígsla*

(Hebrearabrævið 10:7, 9)

1. Jehova Gud, alt tú eigur.
   Tú skapti okkum stað
   við plantum, djórum, menniskjum,
   sum áður ei var sæð.
   Frá tær kom lívsandi, faðir,
   til alt í víðu verð.
   Ja, verdur ert tú til takk og prís
   frá øllum, sum búgva her.

2. Í Jordan Jesus varð doyptur,
   tá bað hann: ’Faðir mín,
   her standi eg til reiðar,
   eg skal gera vilja tín.’
   Um hetta var frammanundan
   í sálmi boðað frá.
   Hann salvaður varð við andanum
   og framdi Guds vísu ráð.

3. Jehova, lívið vit leggja
   so trygg í tína hond.
   Tú læt eitt offur dýrabart
   og loysti deyðans bond.
   Við dópi, faðir, vit biðja:
   ’Tín vilja okkum lær.
   Í lívi og deyða, skapari,
   vit valdu at tæna tær.’

(Les eisini Matt. 16:24; Mark. 8:34; Luk. 9:23.)

53 *Til reiðar at boða*

(Jeremias 1:17)

1. Tíðliga upp,
   skjótt fara vit
   út við góðum tíðindum.
   Men tað er so myrkt,
   bæði vátligt og kalt.
   Freistandi er bert at hugna sær,
   dusa sær.

(NIÐURLAG)

Bara við bøn og fyrireiking
styrkja vit hug og mót.
Gud kann við anda sínum styðja
ótryggan fót.
Jesus er við og góðir einglar,
teir vísa ídnir veg.
Fært tú ein vin at koma við tær,
lagar tað seg.

2. Eitt er vist,
lættari er,
um vit minnast hesi ráð.
Og Jehova sær
alla orku og tíð,
sum vit av hjartanum glað og frí
leggja í.

(Niðurlag)

(Les eisini Præd. 11:4; Matt. 10:5, 7; Luk. 10:1; Tit. 2:14.)

54 *Her er lívsins leið*

(Esaias 30:20, 21)

1. Ein friðarleið er til,
sum Jesus segði frá,
ein aldagomul leið,
so góð at ganga á.
Tín fótur stígur lætt,
tú kennir sannan frið.
Jehova fylgir tær,
her veitst tú, hann er við.

(NIÐURLAG)

Kom, her er lívsins leið, ja, lívsins leið.
Tú setti kós, og rætt tín fótur steig.
Hoyr, røddin kallar: 'Kom hesa leið!
Hygg ikki burt, tú ert á røttu leið.'

2. Ein kærleiksleið er til,
har gongur Gud við tær.
Hann læt teg finna seg,
nú er hann altíð nær.
Guds stóri alskur fer
um dalar og um fjøll,
á hesi fjálgu leið
hann nemur okkum øll.

(Niðurlag)

3. Hygg, her er lívsins leið,
hví líta afturum?
Vit fingu djúpan frið,
ið bar at hjartanum.
Vit sóu kærleikan,
sum lætt at øllum rakk.
Gud vísti vegin fram,
vit siga honum takk.

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 32:8; 139:24; Orðt. 6:23.)

55 *Óttast ei!*

(Matteus 10:28)

1. Kom mítt fólk, gakk støðugt framá,
   boða ríkið vítt og breitt,
   lat tað hoyrast klárt og greitt,
   at mín sonur hevur veitt
   fangum frælsi, vunnið Satan,
   brotið niður alt hans verk;
   skjótt so bindur hann hin ónda,
   verið tí í trúnni sterk.

   (NIÐURLAG)
   Óttast ei, um lív tú letur,
   lívið gáva er frá mær.
   Ert tú trúgvur inn í deyðan,
   ævigt lív eg gevi tær.

2. Um so fíggindarnir fjølgast,
   fremja ágang, elva stríð,
   ella fólk, ið sýnast blíð,
   bara stjala dýra tíð.
   Stúrið ikki, djørvu vitni,
   haldið á so treyst og fró,
   ikki evna tey at kúga
   huga hans, ið stinnur stóð.

   (Niðurlag)

3. Gev tí gætur, ei eg gloymi,
bert hjá mær er verndarhond.
Verða slitin lívsins bond,
er tó uppreisnin í nánd.
Óttast ikki, kristna hetja,
tí eg eigi tína sál.
Eg skal verja trúføst vitni,
leiða tey so trygg á mál.

(Niðurlag)

(Les eisini 5. Mós. 32:10; Neh. 4:14; Slm. 59:2; 83:3, 4.)

56 *Vel sannleikan*

(Orðtøkini 3:1, 2)

1. Tað besta, tú gert, er at tæna Jehova
og ganga á sannleikans vegi.
Men valið er títt, eingin annar kann lova
at tilbiðja Gud fyri teg.

(NIÐURLAG)
Vel nú sannleikan,
lat hann liva frítt í tær.
Stór er gleðin,
sum Jehova gevur,
tá tú velur sannleikan.

2. Við tryggari vón fert tú glaður at boða
um ríkið, har Kristus er kongur.
Títt lív verður ríkt, tú sært hjørtuni loga,
tá menniskju skilja Guds orð.

(Niðurlag)

3. Vit eru sum børn fyri okkara Gudi,
og øll hava hópin at læra.
Tak takksamur við tínum lívi og luti,
tá veitst tú, Gud signar tín dag.

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 26:3; Orðt. 8:35; 15:31; Jóh. 8:31, 32.)

57 *Vit vitna fyri øllum menniskjum*

(1. Timoteusarbræv 2:4)

1. Jehova velja vit til fyrimynd,
sum uttan fordóm elskar alskyns fólk.
Hann sendir boð um frelsu út til øll,
vil savna tey til sín í tryggan bólk.

(NIÐURLAG)

Gud sær hug og hjartalag,
ikki skap og andlitsdrag,
um frelsuna hvørt mansbarn hoyra má.
Ongan mannamun ger Gud,
eingin er við skerdan lut,
hann bjóðar øllum vinalag at fá.

2. Tað ger als ongan mun, hvar nakar býr,
hvat mál hann tosar, ella hvør hann er.
Alt, hjartað goymir, sær Jehova væl,
hann varnast eyðmjúkt sinn og reina gerð.

(Niðurlag)

3. Jehova tekur at sær ein og hvønn,
sum vendir við og biður hann um ráð.
Tað vita vit, tí fara vit nú út
í víðu verð og siga øllum frá.

(Niðurlag)

(Les eisini Jóh. 12:32; Áps. 10:34; 1. Tim. 4:10; Tit. 2:11.)

58 *Leita eftir friðarvinum*

(Lukas 10:6)

1. Sonur Guds segði: ’Boðið sannleikan!’
   Hann var við orði Guds á ferð,
   um dustið feyk, og sólin brann.
   Eymliga Jesus kallaði Guds seyð,
   frá sólin reis,
   og til myrkrið legði seg um land.
   Vit vitja fólk í bygd og bý
   við tíðindum um friðartíð,
   har eingin neyð er til, og alt verður gott.

(NIÐURLAG)

Leita vit væl,
vit sannar friðarvinir finna.
Enn eru fólk,
sum eru rætt til frelsu sinnað.
Leita vit væl,
vit finna tey!

2. Skjótt styttist tíðin, leitið víða hvar!
Nú stendst um lív, vit royna alt
– um bara eitt tó bjargað varð!
Kærleikin vekur hug at gera væl
og bera boð um ta vón,
sum lekir lívsins sár.
Øll leita vit í løtuni
í húsum og á gøtuni
og gleðast, tá ið onkur hoyrir Guds orð.

(Niðurlag)

(Les eisini Es. 52:7; Matt. 28:19, 20; Luk. 8:1; Róm. 10:10.)

59 *Lovsyngið Jah!*

(Sálmur 146:2)

1. Lovsyngið Jah!
   Hevjið hann hátt,
   hann gevur menniskjum alt, ið er gott.
   Kærleika Guds
   hava vit sæð,
   at hann er alvaldur, sanna vit glað.
   Komið og syngið eitt fagnaðarlag!

2. Lovsyngið Jah!
   Hann hoyrir bøn,
   eyðmjúkum gevur hann ríkliga løn.
   Kærleikans Gud
   ongantíð sveik,
   hann gevur megi, har vit eru veik.
   Prísið Guds navni til ljómandi leik!

3. Lovsyngið Jah!
   Gud, ið er nær,
   troystar og gevur tí neyðstadda far.
   Hann dregur móð
   tætt í sín favn,
   leiðir alt fólk sítt í tryggastu havn.
   Komið og dýrmetið Guds stóra navn!

(Les eisini Slm. 94:18, 19; 145:21; 147:1; 150:2; Áps. 17:25.)

60 *Tað stendst um lív*

(Ezekiel 3:17-19)

1. Hetta náðiár Guds
er ein tíð at vísa á,
at Guds dagur við vreiði
er nær og koma má.

(NIÐURLAG)

Tað stendst um lív, øll mannalív,
tað stendst um títt lív og mítt!
At akta Gud og fáa grið
kann ein og hvør tó velja frítt,
velja frítt.

2. Enn er høvi, at fólk
knýta vinabond við Gud,
hann vil, øll skulu fáa
í lívsins gávu lut.

(Niðurlag)

(BRÚGV)

Tað hastar, tað er neyðugt
at fara út og boða frá.
Vit bera fegin øðrum
Guds sannleiksorð og frelsuráð.

(Niðurlag)

(Les eisini 2. Krøn. 36:15; Es. 61:2; Ezek. 33:6; 2. Tess. 1:8.)

61 *Framá, tit vitni!*

(Lukas 16:16)

1. Avgjørd í trúnni vit møta fíggindum,
   Guds fólk verjir sannleikan nú mót endanum.
   Um Djevulin ofta kann hótta,
   vinna vit við Guds hjálp á øllum ótta.

   (NIÐURLAG)

   Ja, framá, tit vitni Guds, boðið víða hvar,
   tí øll skulu frætta, at nú er tíðin nær,
   tá Gud ger av nýggjum eitt paradís á jørð,
   har ið alt verður fullkomin gleði.

2. Tænarar Guds geva ikki lætt uppat;
   vil heimurin leggja Guds vitni undir hat,
   so skulu vit árvakin minnast,
   bert við trúfesti hetta stríð kann vinnast.

   (Niðurlag)

3. Ríkið er vanvirt í dag á mangan hátt.
   Guds heilaga navn verður hildið fyri spott,
   men vit skulu kortini vísa,
   tað skal dýrmett í heilagleika lýsa.

   (Niðurlag)

(Les eisini 2. Mós. 9:16; Fil. 1:7; 2. Tim. 2:3, 4; Ják. 1:27.)

62 *Syngið nýggjan song!*

(Sálmur 98)

1. Syngið hjartans glað Jehova Gudi nýggjan song,
   sigurin er vunnin, Guds armur frelsti mong.
   Lovið undrum Guds, hann er hin sami enn í dag,
   fyri alra eygum fær Harrin rætt í lag.

   (NIÐURLAG)
   Syngið glað,
   ja, syngið nýggjan song!
   Syngið glað
   um ævinleikans kong!

2. Ber Jehova prís, ja, syng í frøi, jørðin øll,
   gleðirómur bylgi um dalar og um fjøll.
   Mannið veldigt kór og syngið Gudi fagran song,
   latið dynja ljóðfør til heiður fyri kong.

   (Niðurlag)

3. Havsins alda sterk, hon brýtur skaparanum prís,
   syng av hjartans frøi, øll mannamúgvan vís.
   Áir, klappið hendur, klappið takkarljóð til kong!
   Fegnist allir heygar, ið girða víðu ong.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 96:1; 149:1; Es. 42:10.)

63 *Vit vitna um Jehova*

(Esaias 43:10-12)

1. Fólk, sum evna gudar til,
myndir uttan lív og skil,
kenna ei tann Gud, ið
fremur alt, hann vil.
Dugdu aðrir gudar spá,
vistu teir at siga frá?
Ongan at vitna hava teir havt,
einki, ið prógvar gudakraft.

(NIÐURLAG)

Vitnið um Jehova øll,
farið fús um fjørð og fjøll!
Alt gongur út, sum Gud hevur sagt,
prógvar, at hann hevur makt.

2. Um Guds navn vit vitna glað,
læra fólk at virða tað.
Tíðindi um ríkið
bera vit hvønn dag.
Sannleikin kann gera frí
tey, sum hava tógvið stríð;
byrðurnar lætna, hjartað fær ró,
Gudi tey lova hjartans fró.

(Niðurlag)

3. Navn Guds verður hevjað hátt,
tá vit vitna um Guds mátt,
reinsa burtur ivan,
gudleys hava sátt.
Gud er góður, bjóðar grið,
elskar tann,ið vendir við.
Heilhugað vitni eiga Guds frið,
vón um eitt lív,ið varir við.

(Niðurlag)

(Les eisini Es. 37:19; 55:11; Ezek. 3:19.)

64 *Komið glað við út at heysta*

(Matteus 13:1-23)

1. Nú grøðin er búgvin at heysta,
   ein framíhjárættur tað er,
   at vit kunnu fara til verka
   og fremja Guds vilja í gerð.
   Í akrinum Jesus gekk undan,
   hann sáddi so dygdargott sáð,
   og grøðina heysta vit hugagóð,
   vit vita, at Harrin er hjá.

2. Vit elska Jehova og næstan,
   tí fara vit íðin av stað.
   Og klárt er, at arbeiðið hastar,
   vit hóma jú seinasta dag.
   Sum samverkamenn hjá Jehova
   vit gleðast um okkara lut
   og bera tí áhaldin orðið út,
   alt signar hin algóði Gud.

(Les eisini Matt. 24:13; 1. Kor. 3:9; 2. Tim. 4:2.)

65 *Ger framstig!*

(Hebrearabrævið 6:1)

1. Ger nú framstig á vegnum, tú búnast á.
   Vinn tær kunnskap og hegni, tak til tín hyggjuráð.
   Sáa nærlagdur ríkisins góða sáð,
   og Jehova signar teg.
   Minst til, her kunnu øll vera við,
   fylgja Jesusi stig fyri stig.
   Lít í øllum á Gud tín, ja, vak og bið,
   so tú velur rættan veg.

2. Ger nú framstig, ber óræddur Harrans orð.
   Tað skal ljóða so víða, úr suðri og í norð.
   Akta Gud, stíg í meistarans fótaspor,
   leið til fylgið Harrans seyð.
   Og um onkur nú vil okkum ilt,
   stillast vreiðin, um svarið er milt.
   Góða orðið er ongantíð burturspilt,
   tá vit gera, sum Gud beyð.

3. Ger nú framstig, røk áhaldin øki títt.
Ger tær ómak, tí orðið skal bjóðast øllum frítt.
Bið um andan,ið gevur tær dirvi nýtt,
og Jehova fylgir tær.
Far í kærleika aftur til hann,
sum við hjálp tíni leiðina fann.
Stór er gleðin, um trúgvin nú mennast kann,
har ein glæma tendrað varð.

(Les eisini Fil. 1:27; 3:16; Hebr. 10:39.)

66 *Ber gleðiboðini*

(Opinberingin 14:6, 7)

1. Eitt loyndarmál um ríki Guds lá leingi dult,
   Gud vil, tað nú skal dragast fram og lýsast fult.
   Hann elskar rætt og miskunn, og hann sá sum satt,
   at menniskjað í syndini var illa statt.
   Eitt ríki skuldi skipa stjórn í røttu tíð,
   so jørðin undan stríð og órætti gjørdist frí.
   Tí sendi hann sín son og valdi honum vív,
   eitt lítið fylgi, klætt í dýrd til himmalskt lív.

2. Og nú á døgum ganga vitni út í verð
   at kunna fólk um ætlan Guds, hans frelsugerð.
   Guds einglalið úr høgum himli fylgir við
   og hjálpir vitnum Guds at bera boð um frið.
   Ta skyldu og ta æru hava vit í dag,
   Guds navn at halga, sáa sannleikans góða fræ.
   Tí ganga vit í navni Harrans hugagóð
   og bera ævig gleðiboð so hjartans fró.

(Les eisini Mark. 4:11; Áps. 5:31; 1. Kor. 2:1, 7.)

67 *Ber nú boð!*

(2. Timoteusarbræv 4:2)

1. Gud biður okkum siga frá,
   bera øllum fólkum lívsneyðug ráð.
   Ver fúsur at siga, hví tú trýr,
   hví vónin djúpt í tínum hjarta býr.

   (NIÐURLAG)
   So ber nú boð,
   tað skal hoyrast víða hvar!
   Ber nú boð,
   sig, at endin er so nær!
   Ber nú boð,
   um at Jesus hevur mátt,
   Ber nú boð,
   alt verður gott.

2. Stundum tú truplar løtur fær,
   lat tá ongan taka mótið frá tær.
   At prædika torført tykjast kann,
   men lítur tú á Gud, so hjálpir hann.

   (Niðurlag)

3. Stundum vit hava góðan frið,
   tá er tørvur á, at øll eru við.
   Ber boð um, at loysn er fyri stavn,
   og vís, tú halga vilt Jehova navn.

   (Niðurlag)

(Les eisini Matt. 10:7; 24:14; Áps. 10:42; 1. Pæt. 3:15.)

68 *Sáa sáð ríkisins*

(Matteus 13:4-8)

1. Hoyr boðini, meistarin gevur,
   hann lítur tær arbeiði til.
   Hann lovar at hjálpa og leiða,
   at geva tær hegni og skil.
   Og sannleikans sáð fær festi og grør,
   har hjartað er ærligt og gott.
   Skal úrslitið verða Jehova til prís,
   mást tú tryggja, at væl verður sátt.

2. Um arbeiðið eydnast til fulnar,
   tað veldst kanska lutvíst um teg,
   tí tann, sum vil hoyra, má læra
   at elska Guds rættvísa veg.
   Veit neyðuga hjálp, tá ivin fær vald,
   ver hjá, tá ið royndin er hørð.
   Fær sannleikans sáðkorn í hjartanum rót,
   kanst tú gleðast og síggja, tað grør.

(Les eisini Matt. 13:19-23; 22:37.)

69 *Framá tit, ið bera boð um ríkið!*

(2. Timoteusarbræv 4:5)

1. Drív á, vitna íðin um ríkið,
lat síggjast í víðu verð,
at kærleiki eyðkennir fólkið,
sum boð frá Jehova ber.
Lær eyðmjúk at velja sær lívið,
ver altíð Guds navni til prís,
ja, gleð teg um tænastu tína,
og lønin frá Gudi er vís.

(NIÐURLAG)
Framá tit, ið bera boð um ríkið
bæði fjart og nær.
Framá, gangið trúlynt við Jehova,
vón hann okkum bar.

2. Sum felagar halda vit áfram,
sí, ung fólk og gomul við,
tveir skarar, ein lítil, ein stórur,
av sonnum eitt fjølbroytt lið.
At ríki Guds kemur við signing,
skal kunngerast menniskjum nú,
og áræðið kemur frá Gudi,
tí vitna vit djørv, eg og tú.

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 23:4; Áps. 4:29, 31; 1. Pæt. 2:21.)

70 *Finn tey, ið eru tað verd*

(Matteus 10:11-15)

1. Vit fylgja tí boðnum, sum meistarin gav:
   ’Gakk treystur, har eg legði spor.
   Far út hús úr húsi og tosa við hann,
   sum er verdur at hoyra Guds orð.
   Ber húsinum heilsan við ynski um frið,
   tá skal friður tín leggja seg har.
   Men um onkur spottar og blakar á dyr,
   rist av fótinum dustið og far.’

2. Og hoyra tey okkum, so hoyra tey Hann
   og gleðast um nøktandi svar.
   Har fólk eru sinnað av røttum til lív,
   dregur Gud tey við orðinum nær.
   At lurta er lætt og at geva sær far,
   tá ið orð títt er dámligt og salt.
   Men ver ikki stúrin, tú roynir sum best,
   minst til, Gud tín skal læra teg alt.

(Les eisini Áps. 13:48; 16:14; Kol. 4:6.)

71 *Vit eru lið Jehova*

(Efesusbrævið 6:11-14)

1. Vit eru lið Jehova,
   Kristus fremstur er.
   Satan vil okkum forða,
   steðga okkara ferð.
   Men í øllum standa vit
   sameind rað á rað,
   bera boð um ríkið,
   óttaleys og glað.

   (NIÐURLAG)
   Vit eru lið Jehova,
   Kristus skipar ferð.
   Glað vit hevja herróp:
   'Ríkið stovnað er!'

2. Vit eru fólk Jehova,
   finna vilstan seyð,
   fólk, ið sær ikki vita
   veg úr iva og neyð.
   Er nú ein, ið lurta vil,
   læra vit hann væl,
   bjóða honum ofta
   við í ríkissal.

   (Niðurlag)

3. Vit eru lið Jehova,
stríða kristið stríð,
herklæði Guds til verju
lata vit okkum í.
Ein og hvør má ansa sær,
aldri víkja frá;
eru vit í vanda,
trúgvin vinna má.

(Niðurlag)

(Les eisini Fil. 1:7; Filem. 2.)

72 *Boða sannleikan um ríkið*

(Ápostlasøgan 20:20, 21)

1. Har var ein tíð, tá tú og eg
so illa funnu rættan veg.
Men Jehova sendi ljós,
sum lýsti inn á røttu kós.
Nú sóu vit Guds vilja greitt,
vit skuldu tæna øll sum eitt,
gera kent Jehova navn
og boða ríkið, sum er fyri stavn.
Vit bera boð í bygd og bý,
at sannleikin ger bundin frí,
so ein og hvør, ið hevur stríð,
kann fáa vón um fagra tíð.
Og boða vit so víða hvar,
Jehova Gud úr himli sær,
at vit tæna fús og glað,
inntil hann sigur, nú er liðugt lag.

(Les eisini Jos. 9:9; Es. 24:15; Jóh. 8:12, 32.)

73 *Gev okkum dirvi*

(Ápostlasøgan 4:29)

1. Vit, ið bera boð um ríkið,
vit, ið navnið seta hátt,
verða illa lýdd og atsøkt,
ofta hildin fyri spott.
Men Jehova, tú ert nær
og sært, vit fegin halda á.
Hoyr, nú bøna vit um tín anda,
lat við honum styrk okkum fá.

(NIÐURLAG)

Góði Gud, gev okkum dirvi,
ver við anda tínum hjá,
so vit íðin og við treysti
sáa lívsins góða sáð.
Til tann dag, tú býtir út løn,
ljóðar heit og innilig bøn:
'Góði Gud, gev okkum dirvi.
Hoyr hjartans bøn!'

2. Mangan mannaóttin lúrir,
Gud, tú veitst, vit eru mold.
At tú lovar okkum stuðul,
styrkir ófullkomið hold.
Gev tí hóttum teirra ans,
sum vilja ilt og volda mein.
Trygg í tínum hondum vit boða,
virka øll í felag sum ein.

(Niðurlag)

(Les eisini 1. Tess. 2:2; Hebr. 10:35.)

74 *Kom og syng um ríkið!*

(Sálmur 98:1)

1. Vit syngja glað um fullveldi Jehova,
   um sigur Guds og jarðarinnar kong.
   Hvørt orð ber troyst og birtir góðar vónir.
   Tak undir, syng við okkum henda song:

   (NIÐURLAG)
   'Kom, tilbið Gud á himli hátt,
   syng um Guds son, sum eigur mátt!
   Kom, lær teg nýggja sangin um Guds ríki.
   Tak undir, syng Jehova navni prís!'

2. Við nýggjum sangi boða vit um ríkið
   og um Guds son, sum hevur fingið makt.
   Ein tjóð er fødd at arva dýrd við honum,
   ta ætlan festi Gud í nýggja pakt.

   (Niðurlag)

3. Øll eyðmjúk fólk tann sangin kunnu læra,
   hann fellur væl og sigur vakurt frá.
   Av mongum vørrum borin út um heimin
   hann gevur øllum góð og hyggin ráð.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 95:6; 1. Pæt. 2:9, 10; Opinb. 12:10.)

75 „Her eri eg – send meg!“

(Esaias 6:8)

1. Guds dýra navn á mangan hátt
   í dag er fyri háð og spott.
   Tað ljóðar: ’Gud ger einki gott,
   hann hevur eyðsæð ongan mátt.’
   Hvør gevur nú Guds navni ans?
   Hvør prísar Gudi sannleikans?

(1. NIÐURLAG)

’Her eri eg, send meg, send meg!
Við sangi skal eg æra teg.
Eg vil so fegin tæna tær, Gud!
Eg skal fara, send tú meg!’

2. Hvør óttast Gud í hesi verð?
   Fólk siga, Harrin seinur er,
   tey gera gudar, dyrka teir,
   ja, onkur dyrkar stein og leir.
   Hvør vil nú vísa dómin á?
   Hvør sigur kríggi Harrans frá?

(2. NIÐURLAG)

’Her eri eg, send meg, send meg!
Eg sigi frá og vísi veg.
Eg vil so fegin tæna tær, Gud!
Eg skal fara, send tú meg!’

3. Nógv spyrja: ’Veksur myrkrið meir?
   Tey óndu mennast, blíva fleir.’
   Men eyðmjúk leita nærri inn
   til Gud, sum gevur frið í sinn.
   Hvør fer at bera teimum troyst?
   Hvør sigur: ’Skjótt tit verða loyst’?

(3. NIÐURLAG)

’Her eri eg, send meg, send meg!
Eg leiði eyðmjúk rættan veg.
Eg vil so fegin tæna tær, Gud!
Eg skal fara, send tú meg!’

(Les eisini Slm. 10:4; Ezek. 9:4.)

76 Gleðist tú?

(Hebrearabrævið 13:15)

1. Gleðist tú innaní,
   tá tú brúkar tína tíð,
   íðin leiðir onnur til
   tann Gud, ið hjálpa vil?
   Hevur tú hjartað við,
   virkar Gud við tína lið,
   sjálvur dregur hann tey inn,
   ið hava eyðmjúkt sinn.

   (NIÐURLAG)
   Vit verða glað, tað er so gott
   at lova Gudi dag og nátt.
   Ja, latið okkum vera vís,
   við vørrum ofra prís.

2. Gleðist tú, tá tú fært
   fólk at steðga á og sært,
   at tey geva øllum far
   og søkja skilligt svar?
   Ein sigur kanska nei,
   velur heldur aðra leið,
   um Guds navn vit boða tó
   og vitna hugagóð.

   (Niðurlag)

3. Gleðist tú nú um frið,
tí tú veitst, at Gud er við,
at hann gav tær vit og skil
og leit tær orð sítt til?
Tosa vit klárt og greitt
um, at lív er okkum veitt,
mennist eyðmjúkt hjartalag
hjá tí, sum íðin bað.

(Niðurlag)

(Les eisini Áps. 13:48; 1. Tess. 2:4; 1. Tim. 1:11.)

77 *Ljós í myrkrinum*

(2. Korintbræv 4:6)

1. Hesa tíð, hesa myrkursnátt,
   sæst eitt skyggjandi ljós.
   Tað ber boð um ein nýggjan dag,
   nýggja tíð, nýggja kós.

   (NIÐURLAG)

   Undurfult er ljósið,
   lýsir upp hjørtu og sinn,
   tað turkar tár av kinn.
   Hygg, nú lættir dimmið.
   Víst man hon enda so brátt,
   tann myrka nátt.

2. Vakna má hvør, ið svevur nú,
   tíðin rennur av stað.
   Birta vón kunnu tú og eg,
   biðja Gud signa tað.

   (Niðurlag)

(Les eisini Jóh. 3:19; 8:12; Róm. 13:11, 12; 1. Pæt. 2:9.)

78 *Lær tey Guds orð*

(Ápostlasøgan 18:11)

1. Ein lærari í orði Guds
kann gleðast um sín lut;
øll elska vit tær løturnar,
vit læra fólk um Gud.
At taka eftir Jesusi
og leggja hjartað í
kann draga eyðmjúk til Jehova,
sum ger tey bundnu frí.

2. At liva rætt og elska Gud
má vera fyritreyt,
um tú vilt beina onnur inn
á lívsins góðu breyt.
Guds orð er sum eitt gripasavn,
eitt nám, vit grava í,
so tey, vit læra, fáa vísdóm
og trúgv um somu tíð.

3. Jehova Gud er altíð við,
hann gevur okkum skil;
so víst hann hoyrir hjartans bøn
og fegin hjálpa vil.
Vit elska alt í orði Guds
um rættan kristnan sið
og gleðast øll, um tey, vit læra,
skjótt læra onnur við.

(Les eisini Slm. 119:97; 2. Tim. 4:2; Tit. 2:7; 1. Jóh. 5:14.)

79 *Lær tey at halda á*

(Matteus 28:19, 20)

1. Hjartans glað vit læra Harrans seyð,
síggja trúnna festa rót.
Gud, sum góður vísti veg úr neyð,
gav tí óttafulla mót.

(NIÐURLAG)

Jehova Gud, tú hoyrir bøn
og goymir trúgvum ríka løn,
í Jesu navni biðja vit: 'Ver teimum hjá,
so tey í trúnni halda á.'

2. Støðugt bóðu vit Gud varða tey
gjøgnum royndir dag um dag,
lærdu tey um alt, sum Jesus beyð,
sóu Gud vælsigna tað.

(Niðurlag)

3. Bara øll nú lýðin halda á,
festa álit sítt á Gud.
Sanna lívið skal, sum sagt er frá,
gevast vinum Guds í lut.

(Niðurlag)

(Les eisini Luk. 6:48; Áps. 5:42; Fil. 4:1.)

80 *Smakkið og síggið, at Jehova er góður*

(Sálmur 34:9)

1. Vit elska at tæna Gudi,
   um ríki hans boða vit glað.
   Tí keypa vit tíð, tað besta fær Gud,
   og nógv er at gera hvønn dag.

   (NIÐURLAG)
   Smakkið og síggið, góður er Gud,
   rætt er, sum vit hava lært.
   Øll skulu kunnast; sum tað var gott,
   vit gjørdu okkara part.

2. Í hondum Guds altíð vardur
   ein fulltíðartænari er.
   Hann veit væl, at Gud kann nøkta hvønn tørv,
   og kennir seg tryggan á ferð.

   (Niðurlag)

(Les eisini Mark. 14:8; Luk. 21:2; 1. Tim. 1:12; 6:6.)

81 *Lívið sum pionerur*

(Prædikarin 11:6)

1. Morgunstund, enn er kvirt, smátt um smátt vakna vit,
biðja still eina bøn,
pakka bøkur og rit, so av stað;
hitta fólk, smílast blíð, tá tey ganga framvið.
Hóast nógv hava skund,
vitna vit um Guds frið dag um dag.

(NIÐURLAG)
Lívið, vit hava valt,
hevur miðvísa kós,
tí vit ganga, har Gud vísir veg.
'At vit røsk halda á,
gloyma veður og vind,
er við gleði, Jehova, tí vit elska teg!'

2. Heim til hús ganga vit, meðan sól fer í kav;
eru móð nú, men glað
um alt, tænastan gav henda dag.
Ja, og Gud eigur takk, hetta lívið er gott!
Tað er frálíkt at boða
um alt, sum hann skjótt fær í lag.

(Niðurlag)

(Les eisini Jos. 24:15; Slm. 92:3; Róm. 14:8.)

82 *Latið ljósið skína*

(Matteus 5:16)

1. ’Latið ljósið skína,’
   vísti Jesus á,
   ’lýsið fyri øllum,
   troystið stór og smá!’
   Tann, ið hoyrir orð Guds,
   gleðist og fær svar.
   Og við okkum ljósið kann
   speglast víða hvar.

2. Gleðiboð um ríkið,
   sum er sett á stovn,
   verða borin víða,
   geva fólki vón.
   Ljósið úr Guds orði
   finnur veg til tann,
   sum av heilum huga vil
   velja sannleikan.

3. Góðar gerðir skína
   bjart á myrkum stað,
   geva orðum virði,
   mangur varnast tað.
   Latið ljósið skína,
   gevið øllum lut
   í tí góða orðinum,
   tað man gleða Gud.

(Les eisini Slm. 119:130; Matt. 5:14, 15, 45; Kol. 4:6.)

83 *Hús úr húsi*

(Ápostlasøgan 20:20)

1. Vit ganga hús úr húsi nú
og boða Harrans orð.
Í býi og á bygd fer boð
um frið og betri kor.
Guds sonur vil, at ríki Guds
skal boðast víða hvar,
tí sært tú ung og gomul glað
til verka skunda sær.

2. Vit bera boð í húsini
um frelsu fyri tann,
ið kallar á Jehova navn
og lítur fast á hann.
Men hvør kann kalla á tann Gud,
hann ikki veit er til?
Guds navn skal gerast kunnigt nú,
so leingi Gud tað vil.

3. So latið okkum fara út
og siga fólki frá,
at ríkið, sum er sett á stovn,
er gott at líta á.
Tí ein og hvør má varast við,
ja, læra um Guds veg,
og tá vit hitta fólk við hús,
tey velja fyri seg.

(Les eisini Áps. 2:21; Róm. 10:14.)

84 *Bjóðar tú tína hjálp?*

(Matteus 9:37, 38)

1. Jehova veit, hvat kennist best,
hvat gleðir teg og gagnar mest.
Tí ríkar hann títt lív hvønn dag
við tænastu av ymsum slag.

(NIÐURLAG)
Bjóðar tú tína hjálp,
er tín Gud í nánd.
Har stórur tørvur er, fegin vit
rætta hjálparhond.

2. Um landið alt, at ytstu strond,
vit hjálpa til og knýta bond.
Vit geva fús og eru við,
í góðum lag og lagalig.

(Niðurlag)

3. Í víðu verð vit byggja nýtt
og væla um, tað fevnir vítt.
Vit læra mál og ferðast glað
við orði Guds til fremmant stað.

(Niðurlag)

(Les eisini Jóh. 4:35; Áps. 2:8; Róm. 10:14.)

85 *Vælkomin øll!*

(Rómbrævið 15:7)

1. Vælkomin øll, sum savnast her í dag
   at hoyra orð Guds og virða tað.
   Øllum er bjóðað lívsins vatn at fá,
   og takksom eru vit, sum Gud kallaði á.

2. Takk fái Gud, ið vildi okkum væl,
   gav góðar brøður í hópatal.
   Ídnir teir fremja tað, sum gagnligt er,
   og øll, ið hava hug, eru vælkomin her.

3. Øll fólk á foldum eru boðin við
   at nema kunnskap og sannan frið.
   Gud dró við Kristi menniskju at sær,
   sig altíð honum takk fyri vinir, tú fær.

(Les eisini Jóh. 6:44; Fil. 2:29; Opinb. 22:17.)

86 *Gud gevur lærdóm*

(Esaias 50:4; 54:13)

1. Komið við gleði og lærið um Jehova,
   her rennur lívsvatn, sum øll kunnu fá.
   Gud, sum er góður, gevur tí svanga
   gagnligan lærdóm og nøktandi ráð.

2. Aldri vit geva uppat at koma saman,
   sameind í kærleika eru vit vard.
   Andi Jehova styrkir og leiðir,
   her skínur ljósið, her verða vit lærd.

3. Søtur er sangur á lærisveinatungu.
   Sangurin gevur tí trúfasta mátt.
   Latið tí okkum savnast við gleði,
   tæna Jehova á degi og nátt.

(Les eisini Hebr. 10:24, 25; Opinb. 22:17.)

87 *Kom og verð styrktur!*

(Hebrearabrævið 10:24, 25)

1. Í heiminum menniskju villast av leið,
tey vraka Guds lívgandi ráð.
Í egnari kraft kemur eingin á mál,
Guds leiðbeining líta vit á.

Á møtunum fáa vit styrki og vón,
har menna vit trúnna á Gud.
Vit eggjast til verka, so vit verða før
at frøast um okkara lut.

Guds vilji skal fremjast, og vit eru klár
at fylgja hans boðum hvønn dag.
Vit savnast at læra um alt, sum er rætt,
og fáa tað fegin í lag.

2. Jehova er varur við okkara tørv,
í gleði og sorg veit hann ráð.
Tí keypa vit fegin ta neyðugu tíð
til møti, sum hann vísir á.

Við trúføstum hirðum Gud lærir sítt fólk,
at trúgvin skal eggja til verk.
Við vinum í trúnni so tætt undir lið
er kenslan av einleika sterk.

At gleðast um lyfti, sum nú ganga út,
vit savnast á møtum í dag
og styrkjast í trúnni á alt, sum er sagt
um tað, sum Gud skjótt fær í lag.

(Les eisini Slm. 37:18; 140:2; Orðt. 18:1; Ef. 5:16; Ják. 3:17.)

88 *Lær meg tín veg*

(Sálmur 25:4)

1. Sum hirðin á fjøllunum savnar sín seyð,
tú bjóðar, og fegin vit møta.
Jehova, títt orð skal lýsa á vegin
til tín, ið kann sorgirnar bøta.

(NIÐURLAG)

Lær meg tín veg, Jehova, gev mær skil,
í øllum royndum er tín læra góð.
Boygg oyra mítt at hoyra tíni boð,
mín størsta gleði verður tá tín lóg.

2. Ótømandi kelda er vísdómur tín,
um dóm tín er fullkomin vissa.
Títt orð vekur ans, tað elvir til gleði
og lív, sum vit ongantíð missa.

(Niðurlag)

(Les eisini 2. Mós. 33:13; Slm. 1:2; 119:27, 35, 73, 105.)

89 *Hoyr, akta og fá signing*

(Lukas 11:28)

1. Sæst tað, at vit kenna Jesusar læru
og fylgja leiðini, hann vísti á?
Við lýdni eru vit Gudi til æru
og vita, hann gevur signingar tá.

(NIÐURLAG)

Hoyr nú Guds orð, og tú sært,
gleði og signing tú fært,
bara tú hoyrir og aktar tín Gud,
gert tað, sum tú hevur lært.

2. Tað lív, tú velur, kann líva og verja
so væl sum hús, ið á hellu er bygt.
Tú lýðir Jesus, tá stormarnir herja,
og veitst, at lív títt við honum er trygt.

(Niðurlag)

3. Ver sum eitt træ, ið er plantað við løkir
og ber sín ávøkst í rættari tíð.
Guds barn, sum hansara leiðbeining søkir,
í allar ævir fær løn fyri stríð.

(Niðurlag)

(Les eisini 5. Mós. 28:2; Slm. 1:3; Orðt. 10:22; Matt. 7:24-27; Luk. 6:47-49.)

90 *Styrkið hvørt annað*

(Hebrearabrævið 10:24, 25)

1. Tá kristin hugsa um hvørt annað,
   í felag fremja vøkur verk,
   sum systkin góð tey knýtast saman,
   so øll í trúnni standa sterk.
   Tann alskur, sannir vinir vísa,
   kann styrkja tey, sum eru móð.
   Tá verður samkoman eitt skýli,
   eitt stað, har hjartað finnur ró.

2. Eitt troystarorð frá góðum vini,
   eitt gagnligt ráð í røttu tíð,
   kann geva troyttum nýggja megi
   at stríða trúarinnar stríð.
   Ja, komið, styrkið nú hvørt annað,
   vit stevna øll á sama mið.
   Og hevur onkur tunga byrðu,
   so hjálpa vit og bera við.

3. Við trúarinnar gløggu eygum
   vit síggja skilliga Guds dag,
   tí ræður um at standa saman
   og gera, sum Jehova bað.
   Ja, komið, styrkið nú hvørt annað
   og leggið alla orku í,
   sum brøður standa vit tá saman
   og tæna Gudi alla tíð.

(Les eisini Luk. 22:32; Áps. 14:21, 22; Gal. 6:2; 1. Tess. 5:14.)

91 *Okkara kærleiksverk*

(Sálmur 127:1)

1. Jehova, takksom og glað
vit standa fyri tær í dag.
Tað hús, vit bygdu her, kom í gerð,
tí tú vildi tað.

Vit bóðu stuðul frá tær,
við tíni signing gavst tú svar.
Vit framdu trúarsterk kærleiksverk,
kendu, tú vart nær.

(NIÐURLAG)

Jehova Gud, tað var ein heiður
at byggja navni tínum hús.
Vit skulu hjartans fegin bera tær allan prís
og dag frá degi tæna fús.

2. Til stóra gleði tað var
at fáa góðar vinir har.
Nú fylla minnini sinnini,
Gud, vit takka tær.

Tín andi elvdi til frið,
tú gjørdi okkum dugnalig,
og navn títt halgað varð, víða hvar.
Takk, at tú vart við!

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 116:1; 147:1; Róm. 15:6.)

92 *Vit bygdu navni tínum hús*

(1. Krønikubók 29:16)

1. Av sonnum ein heiður, Jehova,
at byggja tí navninum hús,
sum lýsir títt æviga veldi;
vit bygdu av hjartanum fús.

Av øllum, tín hond hevur givið,
vit geva tær aftur í dag.
Alt ídni, alt skil, allar gávur,
Jehova, vit lata tær tað.

(NIÐURLAG)
Vit bygdu navni tínum hús
og prísa tær henda dag.
Vit víga navni tínum hús,
faðir, vilt tú signa tað?

2. Nú skulu vit bera tær heiður
og fylla í húsið tín prís.
Leið fólkini higar, Jehova,
at læra ta leið, ið er vís.

Og hjálp okkum handfara húsið
við virðing og røkja tað væl,
at altíð tað prýðir tann boðskap,
sum hiðani prædikast skal.

(Niðurlag)

(Les eisini 1. Kong. 8:18, 27; 1. Krøn. 29:11-14; Áps. 20:24.)

93 *Signa okkum, nú vit savnast*

(Hebrearabrævið 10:24, 25)

1. Gud, vit biðja teg um signing,
   ver við tínum anda hjá,
   tá vit koma inn í hús títt
   einleika og trúgv at fá.

2. Hjartað fyll við tínum orði,
   eina teg vit líta á.
   Legg tú okkum orð á varrar,
   tá vit øðrum geva ráð.

3. Signa okkum, nú vit savnast,
   góði faðir, gev tín frið,
   so vit lova tær í talu,
   fremja dygd og góðan sið.

(Les eisini Slm. 22:23; 34:4; Es. 50:4.)

94 *Gleði um Guds orð*

(Filippibrævið 2:16)

1. Jehova, vit hava tín kærleika merkt,
   vit fingu títt orð, meir enn gull er tað vert.
   Tín andi hevur innblást ta læru, sum er í,
   við sannleika, faðir, tú gert okkum frí.

2. Títt orð klývur anda og innastu sál,
   tað metir um ynski og andalig mál.
   Vit elska tínar lógir, tú dømir altíð satt,
   við leiðreglum beinir tú okkum á rætt.

3. Til hjørtuni talar títt heilaga orð,
   vit lesa um fólk og um gerandiskor.
   Hjálp okkum, góði faðir, at minnast tíni ráð
   og gleðast um alt, sum títt orð sigur frá.

(Les eisini Slm. 19:10; 119:16, 162; 2. Tim. 3:16; Ják. 5:17; 2. Pæt. 1:21.)

95 *Ljósið skínur bjartari*

(Orðtøkini 4:18)

1. Í forðum profetarnir litu í kring,
hvør menniskjans vón mundi vera.
Guds orð hevði sagt um Messias, at hann
í heim skuldi frelsuna bera.

Nú vita vit, Kristus er kongur við tign,
sum teknini boða hvønn dag.
Sjálvt einglarnir ynsktu sær innlit í tað,
sum Guds tænarar nú hava sæð.

(NIÐURLAG)
Vit ganga í bjartasta ljósi,
og gøtuna síggja vit væl.
Vit fegnast í ljósi Jehova
og bera tað fegin á tal.

2. Ein trúfastan træl valdi Kristus sær út,
sum rættstundis ber okkum føði.
At sannleikans ljós skínur bjartari nú,
fær hjørtu at leika í frøi.

Guds ljós vísir leiðina, lýsir so bjart,
tað veksur til alljósan dag.
Vit takka hvønn dag fyri ljósið, hann gav,
og vit ganga, har hann okkum bað.

(Niðurlag)

(Les eisini Róm. 8:22; 1. Kor. 2:10; 1. Pæt. 1:12.)

96 *Bók Guds – ein dýrgripur*

(Orðtøkini 2:1, 4)

1. Ein bók er til, so full av góðum orðum,
   ið geva stóran frið og birta vón.
   Hon vekur undran, hevur í sær megi,
   kann geva ’deyðum’ lív og ’blindum’ sjón.
   Tað er Guds orð, sum trúgvir menn í forðum
   við halgum anda hava fest á blað,
   teir fingu boð og sjónir frá Jehova
   og lótu okkum tað, teir høvdu sæð.

2. Um heimin sigur Bíblian, sum satt er,
   av fyrstum skapti Gud í veldi alt.
   Hann gjørdi jørð og himmal, birti lívið,
   gav menniskjunum boð – um lív tað galt.
   Tá reisti óndur eingil seg við svikum,
   beyð Gudi av og lokkaði í synd.
   Hann leiddi menniskju í sváran trældóm,
   tó lovar Gud at broyta hesa mynd.

3. Vit gleðast nú um kongin, sum Jehova
í himli hevur sett at skipa stjórn,
og bera fegin tíðindi um ríkið
og vón um frelsu fyri mannabørn.
Í hesi gomlu bók er mergjað føði,
eitt andligt borð er búgvið okkum til;
hon bjóðar frið, ið ber av øllum viti.
Guds egna bók kann geva okkum skil.

(Les eisini 2. Tim. 3:16; 2. Pæt. 1:21.)

97 *Okkum tørvar Guds orð*

(Matteus 4:4)

1. Okkum tørvar Jehova orð,
   tað er í okkum lagt.
   Neyðugt er, umframt dagligt breyð,
   alt, sum hann hevur sagt.
   Gleði lovar hann longu nú,
   frálík framtíðarkor.

   (NIÐURLAG)
   Hvørjum orði av munni Guds
   livir menniskjað av.
   Breyð er einsamalt ikki nokk,
   okkum tørvar Guds orð.

2. Í Guds orði vit lesa um
   fólk úr farnari tíð,
   menn og kvinnur, sum altíð trúgv
   livdu vónini í.
   Styrkt av orðinum stíga vit
   somu trúføstu spor.

   (Niðurlag)

3. Gud við orðinum dag um dag
gevur styrki og troyst.
Við Guds vísdómi fáa vit
lívsins tvørleikar loyst.
Latið okkum tí gleðast um
alt, sum Gud ber á borð.

(Niðurlag)

(Les eisini Jos. 1:8; Róm. 15:4.)

98 *Bíblian – innblást av Gudi*

(2. Timoteusarbræv 3:16, 17)

1. Orð Guds kann gjøgnum myrkur svart
   vísa veg og lýsa bjart.
   Øll, ið trúliga fylgja tí,
   skulu av sonnum verða frí.

2. Gud við innblástum orðum vil
   geva okkum neyðugt skil,
   hug og hegni at siga frá
   øllum, sum Skriftin vísir á.

3. Gud fortelur um kærleikan,
   sum í øllum merkir hann.
   Tann, ið lesur Guds orð hvønn dag,
   knýtir við Gud sín vinalag.

(Les eisini Slm. 119:105; Orðt. 4:13.)

99 *Brøður í túsundatali*

(Opinberingin 7:9, 10)

1. Brøður í túsundatali
standa her lið um lið,
trúfastir vitna allir,
tala um sannan frið.
Túsund, ja fleiri túsund,
fylkjast í stóran hóp,
tjóðir og ættir og tungumál
skera í gleðiróp.

2. Brøður í túsundatali
prædika fjart og nær
ævigan gleðiboðskap
– søkjandi fáa svar.
Meðan vit boða ríkið,
kunnu vit verða trongd,
eiga tó hirðan, ið gevur hvíld,
lættir um tunga gongd.

3. Brøður í túsundatali
meta Guds tempul hátt,
leita til forgarð Harrans,
tæna har dag og nátt.
Túsund, ja fleiri túsund,
hópurin uttan tal
kunnger á jørðini orðið um
ríkið, ið koma skal.

(Les eisini Es. 52:7; Matt. 11:29; Opinb. 7:15.)

100 *Verið gestablíð*

(Ápostlasøgan 17:7)

1. Jehova er í blíðskapi fyrimynd,
fer eins við øllum fólki og fjalir synd.
Hann letur regn og sól og bjóðar øllum skjól;
ber mannahjørtum føði og frið.

Tí gera vit sum Gud, taka okkum tíð
at vera bæði fryntlig og gestablíð.
Jehova løna skal alt tað, vit gjørdu væl
mót næstanum við okkara lið.

2. Hvør veit hvat gott, ið stundum kann standast av
at veita onkrum hjálp sína uttan krav?
Um fremmandur ein er, vit vísa trúgv í gerð
og hjálpa, har vit síggja ein tørv.

Sum Lýdia í forðum vit eru fús
at bjóða øðrum við okkum heim til hús.
Jehova veit um øll í smáttu og í høll,
sum líkjast honum vinsæl og blíð.

(Les eisini Áps. 16:14, 15; Róm. 12:13; 1. Tim. 3:2; Hebr. 13:2; 1. Pæt. 4:9.)

101 *Tænið saman í einleika*

(Efesusbrævið 4:3)

1. Út úr hesi ófriðarverð
   Gud sín seyð á graslendi ber,
   har vit njóta einleikans frið
   tætt undir hirðans lið.
   Samkoman er signað,
   søtt er brøðralag.
   Gud leit okkum tænastu til,
   verk, ið krevur ídni og skil;
   undir Jesu leiðslu í dag
   lýðin vit fremja tað.

2. Standa vit í trúnni sum eitt,
   glað um alt, sum Gud hevur veitt,
   kunnu vit í kærleika vís
   bera Jehova prís.
   Friður elvir gleði,
   gevur troyttum mót.
   Er hjá okkum kærleikin mið,
   sendir Gud av himli sín frið,
   samd av hjarta kunnu vit tá
   æviga lívið fá.

(Les eisini Mika 2:12; Zef. 3:9; 1. Kor. 1:10.)

102 *’Takið tykkum av hinum veiku’*

(Ápostlasøgan 20:35)

1. Av og á vit eru øll
veik og neyðarslig.
Gud, sum hevur okkum kær,
varnast hetta við.
Út yvir veikleikan
breiðir hann kærleikan.
Hjálpa kunnu vit sum hann
mild og vinalig.

2. Hava vinir lítla trúgv,
tá tað stendur á,
geva vit í kærleika
hjálp og vinarráð.
Tey hoyra Gudi til,
andin tey styrkja vil.
Fyri teimum biðja vit:
’Faðir, ver tú hjá.’

3. Lítið virdur ofta er
veikur her í verð,
lat hann kenna kærleikan,
tann, ið størstur er.
Rætt honum bróðurhond,
knýt við hann vinabond.
Kanska er tín stuðul júst
tað, sum munin ger.

(Les eisini Es. 35:3, 4; 2. Kor. 11:29; Gal. 6:2.)

103 *Hirðar eru gávur*

(Efesusbrævið 4:8)

1. Okkum til hjálpar Gud hevur veitt
hirðar at røkta seyð.
Teir ganga undan, vísa Guds veg
burtur úr synd og neyð.

(NIÐURLAG)

Gud gevur samkomum góðar menn,
hirðar, sum álit er í.
Fylgið teir røkta, vit elska teir,
dýrabart er teirra stríð.

2. Hirðar, ið mildir geva sær far,
varnast, hvar tørvur er.
Eru vit trongd, so veita teir hjálp,
vanda sær orð og gerð.

(Niðurlag)

3. Hirðarnir vilja fylginum væl,
minna á alt Guds ráð.
Teir veita lívd, um illveðursæl
stundum kann herja á.

(Niðurlag)

(Les eisini Es. 32:1, 2; Jer. 3:15; Jóh. 21:15-17; Áps. 20:28.)

104 *Heilagi andin – gáva frá Gudi*

(Lukas 11:13)

1. Stóri Jehova, miskunnar faðir,
einki hjá menniskjum er tær fjalt.
Andin frá tær er hjálparin mikli,
uggar, um alt tykist dapurt og kalt.

2. Menniskjum fattast dýrd tína, Harri,
veik eru vit, falla lætt í synd.
Bønliga biðja vit um tín anda,
hann vísir vegin, tá vit eru blind.

3. Vónin kann svíkja, hjørtuni stúra,
andin frá tær gevur nýggjan mátt,
tá sum á arnarveingjum vit rísa.
Gev okkum andan, ið fremur alt gott.

(Les eisini Slm. 51:13; Jóh. 14:26; Áps. 9:31.)

105 „Gud er kærleiki“

(1. Jóhannesarbræv 4:7, 8)

1. Gud er góður, og hann vísir
á ein mangan betri veg.
Kærleiki til Gud og næstan
má í øllum merkja teg.
Lær við honum loynu lívsins,
tá er kósin ljós og greið.
Gud er við tær, um tú altíð
gongur hesa góðu leið.

2. Elska Gud og elska sannleik,
og tú fremur kærleiksverk.
Snávar tú, er Harrin hjá tær,
hann, ið ger tey veiku sterk.
Kærleikin ber ikki øvund,
hann er reinur, tolir alt.
Tey, ið elska sínar brøður,
hava góða vegin valt.

3. Hugsa altíð gott um onnur,
goym tær ikki gamalt agg.
Søk Jehova, hann kann ugga,
um tú ei á málið rakk.
Elska Gud og elska næstan,
størsta boð, ið givið er.
Hav tað altíð fremst í huga,
lat tað fylgja tær á ferð.

(Les eisini Mark. 12:30, 31; 1. Kor. 12:31 – 13:8; 1. Jóh. 3:23.)

106 *Latið okkum menna kærleikan*

(1. Korintbræv 13:1-8)

1. Vit boyggja okkum í bøn til Gud
og biðja hann um at fáa lut
í øllum dygdum, sum lýsa hann,
tó fremstan seta vit kærleikan.
At vita nógv og at duga alt
er uttan kærleika tómt og kalt.
Við anda Guds okkum eydnast kann
at menna ektaða kærleikan.

2. Hin sanni kærleikin merkir sær,
hvat øðrum tørvar, og hjálpir har.
Hann fyrigevur og fjalir synd
sum Jesus, okkara fyrimynd.
Í trongdum tolir hann trúgvur ilt
og skýggjar tað, sum er ónt og spilt.
Á øllum kærleikin sigra kann,
og ei á ævini svíkur hann.

(Les eisini Jóh. 21:17; 1. Kor. 13:13; Gal. 6:2.)

107 *Kærleikans leið*

(1. Jóhannesarbræv 4:19)

1. Gud legði ein veg, eitt kærleikans mynstur,
   sum so væl fylgjast skal.
   Hann lærir sítt fólk eitt týðandi kynstur,
   lívsleið, ið ger menniskju sæl.
   Sín elskaða son til jarðar hann sendi,
   hann burtur frá synd og neyð okkum vendi,
   og vónin um lív kom okkum í hendi.
   Skaparans leið er kærleikans leið.

2. Á hesari leið vit fylgjast nú fegin,
   fremja glað brøðralag.
   Og hjálpast vit øll, so fleirfaldast gleðin,
   dag eftir dag minnast vit tað.
   Vit elska jú Gud og okkara næsta,
   tí fjala vit synd nógv heldur enn lasta.
   Í orði og gerð so skilliga sæst tað,
   okkara lóg er kærleikans lóg.

3. Vit eru sum eitt, ein andlig familja,
   semjast væl eydnusæl.
   Og kærleikans band vit eftir Guds vilja
   varðveita væl, styrkjast tað skal.
   Hoyr faðirsins rødd, úr himli hon ljóðar:
   ’Kom, smakka og síggj!’ hann eymliga bjóðar.
   Til alt, sum er gott, hann veg okkum slóðar.
   Okkara Gud er kærleikans Gud.

(Les eisini Róm. 12:10; Ef. 4:3; 2. Pæt. 1:7.)

108 *Trúfasti kærleiki Guds*

(Esaias 55:1-3)

1. Ævigur kærleiki
   lýsir Gud og hansara veg.
   Tann, hann elskaði, sendi hann,
   mannaættini frelsu vann.
   Vónin kveiktist í hjørtum tá
   um tað lívið, ið fyri lá.

   (NIÐURLAG)
   Øll, ið tysta, stór og smá,
   komið, her er vatn at fá,
   kærleiksgáva Gudi frá
   – drekkið úr lívsins á!

2. Kærleikin trúgvur er,
   merkir Gud í orði og gerð.
   Jesus, royndur á allan hátt,
   hevur fingið so stóran mátt.
   Skjótt skal ríkið, sum lovað er,
   fremja alla Guds ætlan her.

   (Niðurlag)

3. Kærleiki Harrin er.
   Latið okkum spegla hann her.
   Eyðmjúk menniskju dregur hann,
   vil, vit læra tey sannleikan.
   Gudi lýðin vit siga frá,
   tí, sum hann okkum vísir á.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 33:5; 57:11; Ef. 1:7.)

109 *Elskið hvørt annað av hjarta*

(1. Pætursbræv 1:22)

1. Kærleikin, vit vísa í gerð,
gleðir Jehova, har hann er.
Okkara Gud er kærleiki,
tí kennir hjartað frið.
Heitar kenslur innaníframá
byggja vit sannan vinskap á.
Kærleikin setur onnur fremst,
gleðist um góðan sið.

Síggja vit ein vin í neyð,
skjótt vit rætta honum hjálparhond,
vísa, at vit leggja í,
styrkja gomul vinabond.

Jesus fúsur ofraði seg,
leið fyri bæði teg og meg,
slóðaði okkum lívsins veg.
Brennandi í okkum er
kærleiksorð og kærleiksgerð.

(Les eisini 1. Pæt. 2:17; 3:8; 4:8; 1. Jóh. 3:11.)

110 *Gleðin í Jehova*

(Nehemias 8:10)

1. Nú vísa tekn, at ríkið er í hondum,
   boðini bera vit í dag.
   Lyftið upp høvd, sí, frelsan er í eygsjón,
   tíð er at syngja takkarlag!

   (NIÐURLAG)

   Ein skansi er gleðin í Jehova.
   Vit fegnast øll og syngja hart.
   At vit fingu vónina, er undurfult,
   og til heiður Guds vit gera vart:
   'Ein skansi er gleðin í Jehova.
   Vit prísa honum fram um alt.
   At tæna Jehova Gudi alla tíð,
   tað er lívið, sum vit hava valt.'

2. Lítið á Gud Jehova, sum vit elska,
   hann breiðir út sín verndarvong.
   Reisist nú øll við torurødd at syngja
   Gudi ein fagran gleðisong!

   (Niðurlag)

(Les eisini 1. Krøn. 16:27; Slm. 112:4; Luk. 21:28; Jóh. 8:32.)

111 *Ein sangur um gleði*

(Matteus 5:12)

1. Av hjartanum eru vit fegin,
ja, okkara gleði er stór.
Nú manna vit, Gudi til heiðurs,
við tjóðanna dýrgripum kór.
Úr orði Guds fáa vit styrki,
har heinta vit dagliga mót,
og tí hevur okkara gleði
í orðinum djúpastu rót.
Ja, gleðina kenna vit ríka,
í hjartanum brennur ein glóð.
Um trongdir og royndir enn koma,
vit tæna Jehova so fró.

(NIÐURLAG)
Vit elska Jehova vár Gud
og frøast um hansara verk.
So ríkur hann er í orði og gerð,
vit sanna, Guds megi er sterk!

2. Vit eygleiða fegin tað skapta,
øll undrini víða um lond,
og tigandi mugu vit sanna,
alt gott er frá hansara hond.
Guds ríki er komið til ræði,
tí boða vit sigursæl frá.
Og menniskjum vísa vit vegin,
so signing tey øll kunnu fá.
Sum dimmið má geva seg yvir,
tá dagurin sigrar á nátt,
so rísur í hjørtunum gleðin,
tá alt, sum er til, verður gott.

(Niðurlag)

(Les eisini 5. Mós. 16:15; Es. 12:6; Jóh. 15:11.)

112 *Jehova, Gud friðarins*

(Filippibrævið 4:9)

1. Jehova, góði Gud,
tú, sum lovar okkum frið,
eyðmjúk biðja vit um andan
og alt gott, sum fylgir við.
Vit leita ráð hjá tær,
sum við soninum kom nær,
vilja fegin fáa friðin,
tann, sum bert tín vinur fær.

2. Tín andi og títt orð
gera okkum trygg á ferð,
lýsa vegin fram í myrkri,
geva vernd í Satans verð.
Skjótt enda kríggj og stríð,
stóri dagur tín er nær.
Inntil tá vit biðja, faðir,
gev tú okkum frið hjá tær.

3. Í himli og á jørð
gera tíni kæru greitt,
at tey stuðla tínum ríki,
standa saman øll sum eitt.
Títt ríki broytir skjótt
alt, sum spillir friðin her,
gevur fólki tínum bústað,
ævigt lív í nýggju verð.

(Les eisini Slm. 4:9; Fil. 4:6, 7; 1. Tess. 5:23.)

113 *Friðurin frá Gudi*

(Jóhannes 14:27)

1. Lov og prís Jehova fær,
friðin gevur hann.
Gud, sum alt úr himli sær,
krígnum steðga kann.
Kristus, friðarhøvdingin,
hevjar rættarsvørð,
vinnur Gudi sigurin,
skapar frið á jørð.

2. Steðgað er alt kegl og stríð,
orð Guds broytir lív.
Nú vit smíða glað og frí
spjót til víngarðsknív.
Til at verja slíkan frið
fyrigevast má.
Henda góða, kristna sið
læra stór og smá.

3. Onnur varnast friðin her,
skilja, Gud er hjá.
Okkum fremst í huga er
alt, hann vísir á.
Sannleiksglæman lýsir skær,
tá vit halda frið,
boða, dagur Guds er nær,
fullur friður við.

(Les eisini Slm. 46:10; Es. 2:4; Ják. 3:17, 18.)

114 *Verið tolin*

(Jákupsbrævið 5:8)

1. Jehova, alra Harri,
er vandin um sítt dýra navn.
Í øldir varð tað vanvirt,
nú lýsir loksins fyri stavn.
Enn bíðar Gud tó tolin,
hevur ætlanir í gerð,
hann bjóðar øllum lívið
í síni nýggju verð.
Av kærleika hann bíðar,
tí kann á jørð hvør ættargrein
í eyðmýkt fyri honum
í allar ævir standa rein.

2. Ja, tol man gagna øllum,
ið vilja ganga røttu leið.
Tað sissar stúrin hjørtu,
tey verða ikki beisk og vreið.
Tað sær alt gott í øðrum,
hevur blítt og jaligt brá,
við tí fær sinnið javnvág,
um hart man leika á.
Við mongum øðrum dygdum,
sum halgi andin fær í lag,
kann tolið hjálpa okkum
at fylgja Gudi dag um dag.

(Les eisini 2. Mós. 34:14; Es. 40:28; 1. Kor. 13:4, 7; 1. Tim. 2:4.)

115 *Undurfulla tol Guds*

(2. Pætursbræv 3:15)

1. Faðir, tú elskar rættferð og rætt,
tú eigur vald og talar satt.
Neyðina sært tú dag um dag,
óndskap og synd av øllum slag.
Greitt er, at tol títt skjótt uppi er,
aldri ert tú ov seinur á ferð.

(NIÐURLAG)

Takksom og trygg, í vónum vís,
skulu vit altíð bera tær prís.

2. Í tínum eygum eitt túsund ár
svunnu sum dagurin í gjár.
Skjótt lýsir fyri degnum, tá
tú skipar rættin foldum á.
Hóast tú hatar syndarans veg,
fevnir tú hann, ið umvendir seg.

(Niðurlag)

(Les eisini Neh. 9:30; Luk. 15:7; 2. Pæt. 3:8, 9.)

116 *Verið blíð og góð*

(Efesusbrævið 4:32)

1. Jehova, av hjarta prísa vit tær
og gleðast um tín veg,
tí hóast títt vit og vald vekur ans,
so eyðkennir kærleiki teg.

2. Og framvegis varnast sonur tín neyð
í hesi óndu verð.
Hann bjóðar tí troytta ok, sum er lætt,
tí blíður og góður hann er.

3. Jehova og Jesus vísa so væl
eitt vakurt hjartalag.
Og heilhugað leggja vit okkum nær
at spegla Guds góðvild hvønn dag.

(Les eisini Mika 6:8; Matt. 11:28-30; Kol. 3:12; 1. Pæt. 2:3.)

117 Góðvild

(2. Krønikubók 6:41)

1. Góði faðir, øll tín signing
gleðir hjartað dag um dag.
Tú ert heilagur og trúgvur,
gott er alt, tú fært í lag.
Og tú fyrigevur mildur,
troystar bæði stór og smá.
Tú ert verdur allan heiður,
einans teg vit líta á.

2. Hetta fólkið, sum tú valdi,
tína góðvild spegla vil,
bera boð um tínar dygdir,
tað er tað, vit skaptust til.
Tínir hirðar læra fylgið,
tað ber ávøkst víða hvar.
Faðir, gev tín góða anda,
so vit altíð fylgja tær.

3. Vilt tú signa tað, vit gera
fyri brøður, stórt og smátt,
bert við tíni hjálp vit kunnu
æra teg á allan hátt.
Ja, í samkomu og heima,
millum grannar, fjart og nær
royna vit at fremja góðvild,
vera lýðin børn hjá tær.

(Les eisini Slm. 103:10; Mark. 10:18; Gal. 5:22; Ef. 5:9.)

118 „Gev okkum meiri trúgv“

(Lukas 17:5)

1. Tú kennir øll, ið tæna tær, Jehova,
tú veitst, vit fingu ófullkomnan lut.
Ein synd er til, sum lætt kann okkum tøla,
at mangla trúgv á teg, vár stóri Gud.

(NIÐURLAG)

Gev okkum trúgv, vit bøna teg, Jehova,
hjálp okkum, Gud, á lívsins truplu ferð.
Gev okkum trúgv, vís fólki tínum miskunn,
lat okkum æra teg í orð og gerð.

2. Ógjørligt er at toknast tær, Jehova,
hjá tí, ið ikki eigur trúgv á teg.
Tín løn er vís, tá onkur á teg lítur,
við trúarskjøldri tryggjar hann sín veg.

(Niðurlag)

(Les eisini 1. Mós. 8:21; Hebr. 11:6; 12:1.)

119 *Vit mugu hava trúgv*

(Hebrearabrævið 10:38, 39)

1. Í forðum og mangan talaði Gud
   við sínum profetum á fold.
   Jehova ber nú við soninum boð:
   ’Vend við til Harran, alt hold!’

   (NIÐURLAG)
   Hvussu sterk er okkara trúgv?
   Er hon roynd og herd eins og stál?
   Vísa gerðir, trúgvin er sonn?
   Við røttu trúnni koma vit á mál.

2. Við gleði vit lýða Jesusar boð
   og birta í menniskjum vón.
   Ja, fús og við dirvi siga vit frá,
   at ríkið er sett á stovn.

   (Niðurlag)

3. Sum akkerið trúgvin vikast ei lætt,
   í vanda hon álitið var.
   Jehova er við, tí halda vit á
   og vita, frelsan er nær.

   (Niðurlag)

(Les eisini Róm. 10:10; Ef. 3:12; Hebr. 11:6; 1. Jóh. 5:4.)

120 *Tak eftir mildleika Kristusar*

(Matteus 11:28-30)

1. Um Jesus var størstur av øllum á jørð,
   var atferðin ongantíð stolt ella hørð.
   Í ætlanum Guds fekk hann stórfingnan lut,
   men aktaði framvegis eyðmjúkur Gud.

2. Við øll tey, sum stúra og overva seg,
   hann sigur: ’Legg byrðuna yvir á meg!’
   Ja, Jesus vil hjálpa, har neyðin er svár,
   so mildur hann turkar av eygum hvørt tár.

3. Vit eru øll brøður, tað hevur hann sagt.
   Í hansara hendur alt valdið er lagt.
   Hann elskar tey mildu, sum liva í trúgv,
   tey fáa í ævir á jørðini búgv.

(Les eisini Orðt. 3:34; Matt. 5:5; 23:8; Róm. 12:16.)

121 *Vit mugu hava tamarhald*

(Rómbrævið 7:14-25)

1. Harran vit elska av hjarta og sál,
   men ofta er torført at røkka á mál.
   Holdið er veikt og elvir til stríð,
   andin frá Gudi ger bundin frí.

2. Satan við snildum kann freista hvønn dag,
   og syndin so treisk syngur lokkandi lag.
   Eru vit viknað, vita vit væl,
   álit á Gud okkum hjálpa skal.

3. Alt kastast aftur á Gud, orð og gerð,
   tí ansa vit okkum í allari ferð.
   Skal ikki syndin taka alt vald,
   mugu vit øll hava tamarhald.

(Les eisini 1. Kor. 9:25; Gal. 5:23; 2. Pæt. 1:6.)

122 *Vit mugu øll standa stinn!*

(1. Korintbræv 15:58)

1. Ófriður valdar í dømdari verð,
   vónloysi eyðkennir menniskjans ferð.
   Harðført er rákið, men vit standa sterk,
   fremja í trúnni Guds verk.

   (NIÐURLAG)
   Verja vit hjarta og sinn,
   kunnu vit øll standa stinn.
   Trúgv og álit á Gud
   leiðir til lívið inn.

2. Freistingar heimsins, ið bjóða seg til,
   krevja, at vit hava dirvi og skil.
   Halda vit fast við Guds orð, sum er satt,
   beinir hann okkum á rætt.

   (Niðurlag)

3. Gudi vit tæna av hjarta og sál,
   bara við honum vit koma á mál.
   Fegin og áhaldin siga vit frá
   lyftunum, vit líta á.

   (Niðurlag)

(Les eisini Luk. 21:9; 1. Pæt. 4:7.)

123 *Trúføst undir Guds skipan*

(1. Korintbræv 14:33)

1. Sum Guds fólk vit ganga út í víðu verð,
bera boð um ríkið, sum skal ráða her.
Vísa vit í verki, at vit eru trúgv,
líta í Guds hendur bæði lív og búgv?

(NIÐURLAG)

Gudi Jehova trúføst vit lova
bæði í orð og gerð.
Verju hann gevur, umsorgan hevur,
elskar tann, ið trúgvur er.

2. Andin frá Jehova leiðir okkum her,
trælur Guds ger vart við rætta kristna ferð.
Væl er fólkið skipað, Gudi dámar skil,
leggur tí úr himli ríka signing til.

(Niðurlag)

(Les eisini Luk. 12:42; Hebr. 13:7, 17.)

124 *Trúføst í øllum*

(Sálmur 18:26)

1. Gudi trúføst eru vitni,
   sum av sonnum elska hann.
   Vígda fólkið stendur saman
   um Guds boð og sannleikan.
   Ráð vit fáa frá Jehova,
   tann, ið gevur ans, fær vit,
   allar ævir er hann tryggur,
   tænir Gudi uttan slit.

2. Trúgvir brøður standa saman,
   veita fúsir hjálp í neyð.
   Millum okkum ræður álit,
   eingin ivi, einki sleyg.
   Ja, vit elska allar brøður,
   virða teir av instu sál.
   At vit fylgjast, gagnar øllum,
   saman koma vit á mál.

3. Tá ið brøður eru hirðar,
   røkta Harrans seyð í dag,
   hugagóð vit geva gætur,
   fylgja ráðum teirra glað.
   Øll tey trúgvu verða signað,
   tí tey fylgjast Gudi við;
   móti trúgvum er hann trúgvur,
   heldur vakt við teirra lið.

(Les eisini Slm. 149:1; 1. Tim. 2:8; Hebr. 13:17.)

125 *Tey miskunnsomu eru sæl*

(Matteus 5:7)

1. Jehova miskunnsamur er,
hann gleðist um ta góðu gerð.
Tað, okkum tørvar, gevur hann,
í neyðini hann hjálpa kann.
Jehova hoyrir stilla bøn
og lovar okkum ríka løn.
Vit vita, um vit eru veik,
Guds miskunn okkum aldri sveik.

2. Tá syndin yvir okkum vann,
og vit um náði biðja hann,
so vísir Jesus okkum á
ta bøn, ið ikki gloymast má:
’Gud, fyrigev, eg biði teg,
tú sært, tað sama royni eg.’
Vit sissast tá so við og við
og fáa aftur sálarfrið.

3. Vit geva gávur hjartans glað,
um eingin gevur far um tað,
tí vinstra hond veit ikki av,
hvat høgra hond í loyndum gav.
Úr himli varnast Gud tó alt
og lønir aftur hundraðfalt.
Av royndunum vit vita væl,
tey miskunnsomu eru sæl.

(Les eisini Matt. 6:2-4, 12-14.)

126 *Verið vakin, føst og mennist!*

(1. Korintbræv 16:13)

1. Verið vakin, føst og mennist,
tit, ið stríða trúarstríð.
Gangið fram við góðum treysti,
sigurslønin veittrar blíð.
Kemur boð frá Kristi, akta vit,
tæna hugagóð og uttan slit.

(NIÐURLAG)
Verið vakin, støðuføst, mennist!
Haldið á, til liðugt er!

2. Verið vakin og til reiðar,
hvar ið enn tit eru stødd.
Hoyrið skilagóða trælin
gera vart við hirðans rødd.
Gevið ráðum teirra elstu ans,
minnist til, teir røkta fylgi hans.

(Niðurlag)

3. Verið vakin, standið saman,
tit,ið bera boð um frið.
Um so fíggindarnir hótta,
vita vit, at Gud er við.
Syngið prís Jehova út um lond.
Nú er stóri dagur Guds í nánd.

(Niðurlag)

(Les eisini Matt. 24:13; Hebr. 13:7, 17; 1. Pæt. 5:8.)

127 *Tann, sum tú vilt, eg skal vera*

(2. Pætursbræv 3:11)

1. Lívsins gávu fekk eg, Jehova, frá tær,
kann eg geva nakað afturfyri frá mær?
Títt orð hevur kraft, speglar hjarta og anda,
lat meg síggja rætt, um mín sál er í vanda.

(BRÚGV)

Eg gav tær eitt lyfti og tæni tær nú,
at tað er mín gleði, góði faðir, veitst tú.
Tú kennir mítt hjarta, eg elski tín veg,
og gongst, sum eg vil, so gleði eg teg.

Lær meg á at skyna, á Gud, gev mær skil.
Tú sært, hvør eg eri, faðir, evna meg til
og ger meg til tann, sum tú vilt, eg skal vera,
ja, vís tú mær á, hvat ið best er at gera.

(Les eisini Slm. 18:26; 116:12; Orðt. 11:20.)

128 *Halt út til endan*

(Matteus 24:13)

1. Guds orð og alt, ið lovað er,
kann stimbra hug og sinn.
Við kærleika til sannleikan
vit standa hugreyst og stinn.

Hav greitt í huga Harrans dag,
minn teg á, at hann er nær.
Um hart man leika á, tú veitst,
frá Gudi tú styrki fær.

2. Miss ikki fyrsta kærleikan,
hann kveikir í tær mót.
Í trongdartíðum roynist hann
og fær í hjartanum rót.

Lat ongan iva níva teg,
ver í bøn Jehova nær,
hann leiðir teg um vandasjógv,
er mentur at bjarga tær.

3. Hvør tann, ið trúgvur heldur á,
til stríðið liðugt er,
skal teljast millum tey, sum Gud
til sigurvinnarar ger.

Í lívsins bók hann skrivar sær
tey, ið eru honum kær;
ja, tann, ið tolin heldur út,
ta ævigu gleði fær.

(Les eisini Hebr. 6:19; Ják. 1:4; 2. Pæt. 3:12; Opinb. 2:4.)

129 *Vit halda út við gleði*

(Matteus 24:13)

1. Hvussu klára vit
tær trongdir, Jesus segði frá?
Sjálvur leið hann nógv,
men tað, sum hjálpti honum tá,
var lyftið um gleði,
sum fyri honum lá.

(NIÐURLAG)
Vit halda út við gleði
og víkja aldri frá,
tí vónin gevur megi,
og lív fær tann, ið trúgvur heldur á.

2. Um á lívsins leið
vit fáa sorg og stríggin ár,
eiga vit tó vón
og hóma gjøgnum sorgartár
tað frælsið, tann friðin,
ið grøðir lívsins sár.

(Niðurlag)

3. Aldri gevast vit,
   vit loyva ongum iva inn.
   Nær er dagur Guds,
   tí ræður um at standa stinn.
   Vit bíða í tolni
   og styrkja hug og sinn.

   (Niðurlag)

(Les eisini Áps. 20:19, 20; Ják. 1:12; 1. Pæt. 4:12-14.)

130 *Fyrigevið*

(Sálmur 86:5)

1. Góður læt Jehova
fyri okkum dýra bót;
Jesus doyði fyri syndir,
legði deyðan undir fót.
Angra vit av reinum hjarta,
er Guds fyrigeving vís,
glað vit tá í Jesu navni
kunnu bera Gudi prís.

2. Miskunn Guds vit fáa,
tá vit gera eins og hann,
fjala syndir hvør hjá øðrum,
íðin verja kærleikan.
Læra vit at virka saman,
leggja burtur gamalt agg,
kunnu vit sum sannir brøður
siga himna Gudi takk.

3. Miskunn er tann dygdin,
sum skal mennast dag um dag.
Tá kann sinnið, ið ber hatur,
verða broytt til annað lag.
Um vit elska Gud Jehova,
sum so miskunnsamur er,
læra vit at fyrigeva,
spegla kærleikan í gerð.

(Les eisini Matt. 6:12; Ef. 4:32; Kol. 3:13.)

131 *’Tað, Gud hevur bundið saman’*

(Matteus 19:5, 6)

1. Við Gudi sanna vit,
   tá tvey nú verða eitt,
   at heilagt er tað lyftið,
   tey bæði hava veitt.

(1. NIÐURLAG)

Hann lovar henni trúskap:
’Mítt hjarta eigur tú.’
Lat ongan slíta bandið,
Jehova bindur nú.

2. Nú biðja tey sín Gud
   um signing og um ráð,
   í hjúnabandið tvinna
   sín sterka triðja tráð.

(2. NIÐURLAG)

Hon lovar honum trúskap:
’Mítt hjarta eigur tú.’
Lat ongan slíta bandið,
Jehova bindur nú.

(Les eisini 1. Mós. 2:24; Præd. 4:12; Ef. 5:22-33.)

132 *Vit eru eitt*

(1. Mósebók 2:23, 24)

1. Nú ert tú mín, tú valdi meg,
vit skulu ganga kærleikans veg.
Gud gav mær vin fyri lívið,
altíð eg elski teg.

Vit eru eitt, saman um alt,
hetta er lívið, vit hava valt.
Sum hjún í felag vit ganga
við Gudi dag um dag.

Vísdómsráð vit fegin líta á,
Gud, sum gevur skil,
í ævir signa tað vil.

Vit knýttu bond, seta nú búgv,
liva eitt lív í gleði og trúgv.
Jehova Gudi til æru
vit halda saman nú sum eitt.

(Les eisini 1. Mós. 29:18; Præd. 4:9, 10; 1. Kor. 13:8.)

133 *Tilbið Jehova í ungdóminum!*

(Prædikarin 12:1)

1. Gleða vit Gud, meðan vit eru ung,
   gevur hann styrki, tá leiðin er tung.
   Trúskap og kærleika gleðist hann við,
   er sum ein vinur við okkara lið.

2. Æra vit mammu og pápa hvønn dag,
   so verður heimið eitt hugnaligt stað.
   Vit tosa opið, og tey geva ráð,
   Gud kennir gleði í hjartanum tá.

3. Alvalda skaparan minnast vit til,
   hann gevur ungdómum kunnskap og skil.
   Okkara ídni úr himli hann sær,
   altíð tað besta frá okkum hann fær.

(Les eisini Slm. 71:17; Sorgars. 3:27; Ef. 6:1-3.)

134 Børn eru gáva frá Gudi

(Sálmur 127:3-5)

1. Tá ein maður verður pápi,
og ein mamma tekur barn sítt í favn,
so vita tey, at tað er gáva,
og fegin æra tey Guds navn.
Hjá honum rennur lívsins kelda,
hann lítur okkum dýra lívsfrukt til;
foreldrum vil hann fegin hjálpa
í truplum løtum at nýta skil.

(NIÐURLAG)

Heilagan arv tit hava fingið,
ein dýran skatt tit eiga her.
Lær barnið upp á Harrans vegi
at fremja vilja Guds í gerð.

2. Alt, Jehova hevur álagt,
má í hjarta tínum varðveitast væl,
so tað kann gagna tínum børnum
og berast fram í orð og tal.
Legg tú Guds orð í tey á vegnum,
tá tú fert upp, og tá tú aftur legst.
Tað verður vart í hjartans goymslum
sum góður arvur, tú teimum fekst.

(Niðurlag)

(Les eisini 5. Mós. 6:6, 7; Ef. 6:4; 1. Tim. 4:16.)

135 *Inniliga áheitanin frá Jehova: „Ver vísur, sonur mín!“*

(Orðtøkini 27:11)

1. Mín sonur, mín dóttir
– kom, lurta eftir mær.
Ver í mínum hondum
mót fíggindanum svar.
Av hjartanum fegin
til mín tú gevur teg,
og øllum er skilligt,
tú livir fyri meg.

(NIÐURLAG)
Mítt góða barn, tit góðu ungu,
eg leiði tykkum lívsins veg.
So tænið mær íðin av hjarta,
ja, verið vís og gleðið meg.

2. Njót ungdómin, gleð teg,
tú hevur meg til vin.
Í mótgangi hjálpi
eg tær at fáa skyn.
Um onkur nú svíkur
og vendir sær frá tær,
tú veitst, at um ævir
tú vinur ert hjá mær.

(Niðurlag)

(Les eisini 5. Mós. 6:5; Præd. 11:9; Es. 41:13.)

136 *Jehova gevur fulla løn*

(Rutt 2:12)

1. Jehova er trúgvur og góður við øll,
sum vitna av hjarta og sál.
Hann sær, at tey fús lata frá sær so mangt
og seta sær andalig mál.
Fórt tú frá foreldrum og vinum av stað,
so veitst tú, Jehova tað sá.
Hann gevur tær brøður og systrar í dag
og lyfti, sum vit líta á.

(NIÐURLAG)

Gud, ið sær teg, skal geva fulla løn,
ja, hann skal signa teg og vísa leið.
Tú finnur skjól undir veingjum hans.
Jehova er trúgvur – hann gloymir teg ei.

2. Viðhvørt kennist okkara lív kanska tungt,
tað er sum eitt endaleyst stríð.
Og tankarnir mala um ófrið og neyð,
tí nú er ein hættislig tíð.
Men minst til, at Gud hoyrir eyðmjúka bøn,
hann lovar, at vit verða loyst.
Hann gevur tær andan og orðið til hjálp
og vinir, ið bera tær troyst.

(Niðurlag)

(Les eisini Dóm. 11:38-40; Es. 41:10.)

137 *Trúfastar kvinnur, kærar systrar*

(Rómbrævið 16:2)

1. Sára, Maria, Ester, Rutt og aðrar
vóru av raskastu kvinnum, trúføst vív.
Avgjørdar tæntu tær Gudi alt sítt lív,
og tí kenna vit tær enn tann dag í dag.
Nógvar aðrar trúgvar kvinnur vóru;
navnið veit Jehova, um onnur gloymdu tað.

2. Kærleiki, góðska, eyðmýkt, trúgv og dirvi
– hetta hjá kvinnunum frammarlaga lá.
Hesar, sum Bíblian vísir okkum á,
eru fyrimyndir fyri teg og meg.
Tá ið systrar fylgja teimum eftir,
vita vit við vissu, Jehova gleðir seg.

3. Møður og døtur, systrar, konur, einkjur
tæna við ídni og gleðast um sín lut.
Spakføra lyndið og álitið á Gud
prýða allar tær, ið ganga lívsins veg.
Góða systir, lat Jehova hjálpa,
lat hann styrkja trúnna, og lat hann frelsa teg.

(Les eisini Fil. 4:3; 1. Tim. 2:9, 10; 1. Pæt. 3:4, 5.)

138 „Grá hár eru vøkur krúna“

(Orðtøkini 16:31)

1. Vinir Guds, ið elliár
kenna á sær nú,
virða vit og gleðast um,
bæði eg og tú.
Onkur situr eina nú,
vinur hans ert tú.
Mátturin er farin, men
trúgvin livir enn.

(NIÐURLAG)
Faðir, tú manst minnast
teirra trúgvu slóð.
Gev teim fulla vissu,
trygga vón og ró.

2. Fagurlig tey gráu hár,
Gud man frøa seg,
tá tey verða funnin á
rættvísinnar veg.
Trúføst eldri vóru ung,
tóku tøk so tung,
stríddust altíð Gudi nær,
meðan megin bar.

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 71:9, 18; Orðt. 20:29; Matt. 25:21, 23; Luk. 22:28; 1. Tim. 5:1.)

139 *Kom, hugsa tær!*

(Opinberingin 21:1-5)

1. Kom, hugsa tær ein nýggjan heim,
   har tú og eg hava gleði og gleim.
   Ja, hugsa tær at sleppa við,
   at stíga lætt, kenna djúpan frið!

   Als einki ilt vit síggja tá,
   Jehova sjálvur er okkum hjá.
   Og tíðin er komin, tá hann ráða skal,
   við ljómandi sangi vit prísa honum sæl.

(NIÐURLAG)

'Jehova, vár Gud, vit lova tær øll!
Í nýggjum skrúð standa heiðar og fjøll.
Í hjørtunum er gleðin ein brennandi glóð,
í ævir vit prísa tær, Gud, tín leið er góð.'

2. Nú ert tú her, tú eins og eg!
Tú andar frítt, einki ørkymlar teg;
als eingin sjón, als einki ljóð,
kann spilla friðin og hjartans ró.

Á øllum Gud nú hevur vald,
og yvir okkum hann reisir tjald.
So vekur hann øll tey, sum deyðin sær vann,
tey tríva við okkum í sang, sum heiðrar hann:

(Niðurlag)

(Les eisini Slm. 37:10, 11; Es. 65:17; Jóh. 5:28; 2. Pæt. 3:13.)

140 *Ævigt lív – umsíðir!*

(Jóhannes 3:16)

1. Paradís, hugsa tær tað,
   fólk, ið hugna sær saman.
   Friðurin er tryggur her,
   Gud turkar burtur tár.

   (NIÐURLAG)
   Syngið so hjartans glað,
   frelsu fær Gud í lag!
   Alt verður brátt trygt og gott,
   vit fáa ævigt lív.

2. Øll so ung, spælandi fim,
   eiga frið við Jehova.
   Als eingin ber ótta her,
   burtur er sorg og neyð.

   (Niðurlag)

3. Paradís, okkara heim,
   alt er blivið sum lovað.
   Komið nú fró, hugagóð,
   berið Jehova prís!

   (Niðurlag)

(Les eisini Job 33:25; Slm. 72:7; Opinb. 21:4.)

141 *Undursama lívið*

(Sálmur 36:10)

1. Summarregn og sól, blóman, sum tú sær,
stjørnurnar og fjøllini, barnið, sum lær
– gávurnar, Gud gav, vísa, hvør hann er,
undrini av hondum Harrans síggja vit her.

(1. NIÐURLAG)

Hvat annað kunnu vit enn at takka glað,
elska hann, ið skapti lívið og gav okkum tað?
Tí lívið gáva er, sum eingin fær keypt sær,
og gávuna gav Gud – tað undursama lív.

2. Onnur geva upp, vita eingi ráð.
’Gloym nú Gud,’ er hugsanin, ’fylg tíni trá.’
Øvut hugsa vit, geva Gudi prís
fyri allar løturnar, vit liva sum vís.

(2. NIÐURLAG)

Hvat annað kunnu vit enn at takka glað,
elska tey, vit hava tætt hjá, og vísa teim tað?
Tí lívið gáva er, sum eingin fær keypt sær,
og gávuna gav Gud – tað undursama lív.

(Les eisini Job 2:9; Slm. 34:13; Præd. 8:15; Matt. 22:37-40; Róm. 6:23.)

142 *Okkara trygga og fasta vón*

(Hebrearabrævið 6:18, 19)

1. Menniskjans trilvan var nyttuleys í øldir,
   strembanin vónleys, ein roynd at veiða vind.
   Menn stóðu fastir, í misgerðir tøldir,
   hvør kundi bjarga og basa synd?

   (NIÐURLAG)
   Vónin er bjørt, ríki Guds hevur vald.
   Hjá fíggindum tíðin er markað og tald.
   Veiróp skal broytast til sangara rødd,
   tann lívsæla vón er í hjørtunum fødd.

2. ’Hví loyvdist óndskapi rásarúm so leingi?’
   Spyrt tú í ótta Jehova, fært tú svar:
   ’Óndskapar leinkjur eg brádliga spreingi!’
   Ber honum prís, nú er loysnin nær.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 27:14; Præd. 1:14; Jóel 2:1; Hab. 1:2, 3; Róm. 8:22.)

143 *Røsk og árvakin skulu vit bíða*

(Rómbrævið 8:20-25)

1. Við fullum rætti Jehova
   í allar ævir kann ráða,
   men tíðarteknini vísa,
   ein rættaruppgerð er nær.

   (NIÐURLAG)

   Røsk og árvakin skulu vit bíða,
   gleðast, til vit verða fríað,
   tá er alt farið, sum var.

2. Skjótt koma boðanir greiðar,
   Guds sonur ger seg til reiðar,
   hann dregur svørðið úr slíðra,
   við kraft hann fíggindan slær.

   (Niðurlag)

3. Um øll í løtuni líða,
   við góðum vónum vit bíða.
   Í trúnni eru vit vakin
   og skilja, frelsan er nær.

   (Niðurlag)

(Les eisini Matt. 25:13; Luk. 12:36.)

144 *Minst til tína ævigu løn!*

(2. Korintbræv 4:18)

1. Tá hin blindi morgunroðan sær,
og hin deyvi hoyrir barn, ið lær,
tá skal eingin óttast nakað ilt,
tí alt er friðarligt og stilt.
Tá ið tey, vit mistu, vakna við,
og øll jørðin hevur fingið frið,

(NIÐURLAG)
hevur Gud til fulnar svarað bøn.
Minst til tína ævigu løn!

2. Tá ið lamb hjá úlvi leggur seg,
og tá bjørnin ongum ger fortreð,
kann ein lítil drongur leiða øll
– tey ganga trygg um grønan vøll.
Tá ið eingin longur fellir tár,
og vit gloyma sorg og strævin ár,

(Niðurlag)

(Les eisini Es. 11:6-9; 35:5-7; Jóh. 11:24.)

145 *Lyfti Guds um eitt paradís*

(Lukas 23:43)

1. Eitt paradís er okkum lovað.
   Ein friðarstjórn í túsund ár.
   Vit verða loyst úr syndabandi,
   Gud turkar burt hvørt sorgartár.

   (NIÐURLAG)
   'Í paradís skalt tú við mær!'
   So troystarríkt tað lyftið var.
   Og Jesus fekk frá Gudi makt
   at fremja alt, sum frá er sagt.

2. Skjótt vakna deyð, sum grøvin goymir,
   tey koma fram, so hjartans glað.
   Alt verður tá, sum Jesus segði,
   eitt friðarligt og vakurt stað.

   (Niðurlag)

3. Vit vænta nú, sum Jesus lovar,
   eitt paradís og sannan frið.
   Vit takka glað og prísa Gudi,
   ja, komið øll og syngið við!

   (Niðurlag)

(Les eisini Matt. 5:5; 6:10; Jóh. 5:28, 29.)

146 „Eg geri alt nýtt!“

(Opinberingin 21:1-5)

1. Øll teknini vísa, Guds ríki er her,
   í hásætið sonurin settur er.
   Úr himlinum rendi hann fíggindan,
   Guds vilji til fulnar nú fremjast kann.

(NIÐURLAG)

Tað gleðir ein og hvønn, sum trýr:
Skjótt Gud hjá mannabørnum býr.
Hann steðgar deyðanum og turkar tár,
hann grøðir eymliga øll mein og sár.
Á jørðini hann skapar frið og rætt.
„Alt nýtt!“ sigur orðið satt.

2. Úr himlinum kemur Jerusalem nýtt
   sum brúður til lambið so fagurt prýtt.
   Frá brúðgómi sínum hon vinnur rós,
   Jehova er hennara dýrd og ljós.

(Niðurlag)

3. Øll virða við gleði Guds heilaga stað,
   hvørt portur er upplatið nátt og dag.
   Í skini frá staðnum vit ganga her
   og spegla nú ljósið í orð og gerð.

(Niðurlag)

(Les eisini Matt. 16:3; Opinb. 12:7-9; 21:23-25.)

147 *Lyftið um ævigt lív*

(Sálmur 37:29)

1. Gud gav í forðum eitt lyfti,
   tí sigur Bíblian frá.
   Fólk skulu liva í ævir,
   búgva jørðini á.

   (NIÐURLAG)
   Gud lovaði lívið,
   í lovsongin trívið!
   Um aldur og ævir
   Gud heldur sítt orð.

2. Skjótt verður paradís aftur.
   Børn Guds, av syndini frí,
   undir Guds leiðslu úr himli
   liva æviga tíð.

   (Niðurlag)

3. Deyð skulu skjótt vakna aftur,
   gloymd verða sorgartung ár.
   Gud gevur signing úr himli,
   turkar burtur øll tár.

   (Niðurlag)

(Les eisini Es. 25:8; Luk. 23:43; Jóh. 11:25; Opinb. 21:4.)

148 *Jehova er skjól*

(2. Sámuelsbók 22:1-8)

1. Jehova, tú ert skaparin, vit ivast ei.
   Í himli og á jørð tín dýrd er okkum greið.
   Og eingin annar gudur fær gjørt sum tú,
   bara tú
   fíggindan týna kann.

   (NIÐURLAG)
   Jehova er kletturin, har vit kroka.
   Teim trúgvu er hann vorðin fjall og verjuborg.
   Hoyr, vit boða: 'Jehova er skjól, ákallið hann.
   Prísið honum, ið eigur alt vald og bjarga kann.'

2. Um deyðans tog nú binda meg, so biði eg:
   'Gud, gev mær kraft og mót, og leið meg rættan veg.'
   Í templi tínum hoyrir tú róp frá mær:
   'Bjarga mær,
   ver við mær, góði Gud!'

   (Niðurlag)

3. Tín rødd úr himli dunar eins og toruljóð.
   Øll jørðin gongur kyk, bert tíni kenna ró.
   Tú fremur tína ætlan – vit skilja tað,
   vilja tað,
   tú okkum frelsa skal.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 18:2, 3; 144:1, 2.)

149 *Ein sigursongur*

(2. Mósebók 15:1)

1. Lovið Jehova! Tí navnið er vert alla æru.
   Í Reyðahavið rendi hann kong og stóran her.
   Ber honum heiður,
   tí eingin er hansara líki.
   Jehova eitur hann,
   sum so sigursvissur er.

   (NIÐURLAG)
   Jehova Gud, tú alvaldur er,
   við signing tíni lýsir fyri stavn.
   Tú beinir burtur fíggindanna her
   og halgar, Gud, títt dýra navn.

2. Kongar og tjóðir nú brynjast til stríð móti Gudi,
   sum Farao í forðum teir treiskir halda á.
   Dómurin bíðar,
   tað stríðið teir ei kunnu vinna.
   Jehova er hin hægsti,
   bert hann vit líta á.

   (Niðurlag)

(Les eisini Slm. 2:2, 9; 92:9; Mal. 3:6; Opinb. 16:16.)

150 *Søk Gud, og hann skal verja teg*

(Zefanias 2:3)

1. Tjóðflokkar leggja ráð
   um son Guds at herja á.
   Tó teirra tíð er farin nú,
   sum sagt er heiminum frá.

   Gud skipar sigursferð,
   og ríkið, ið stovnað er,
   skal døma heimin og týna øll,
   ið fremja gudleysa gerð.

(NIÐURLAG)

Søk Gud, og hann skal verja teg,
við anda sínum vísa veg.
Søk nú rættferð hans,
gev í lýdni ans,
vel Guds ríki, sum er í nánd.
Jehova heldur yvir tær
sína sterku hond.

2. Fáið nú øll á tal,
tí avgerðin takast skal;
at akta ella vraka Gud,
ja, tað er menniskjans val.

Royndir og spott og spei
vit fáa, men óttast ei.
Jehova verjir og signar tann,
ið er á rættari leið.

(Niðurlag)

(Les eisini 1. Sám. 2:9; Slm. 2:2, 3, 9; Orðt. 2:8; Matt. 6:33.)

151 *Gud skal rópa*

(Job 14:13-15)

1. Lívið sum roykur steðgar á eitt bil
og burtur er í morgin.
Tann, ið vit elska, er ei longur til,
bert gráturin og sorgin.
Er so einki meir, tá ein maður doyr?
Gud sítt lyfti gevur, hoyr:

(NIÐURLAG)
'Eg skal rópa, tú skalt svara,
rísa upp hin síðsta dag.
Eg goymi teg í minni,
havi skrivað teg á blað.
Lít á meg og ivast ikki,
tær er búgvið betri stað.
Í ævir skalt tú liva,
fagna lívinum hvønn dag.'

2. Gud minnist væl tann vin, sum deyðin tók,
er hjá, har sorgin nívir.
Navnið er fest í lívsins dýru bók
– eitt troystarorð, ið lívir.
Hann skal rakna við, Gud skal geva grið,
ævigt lív og sælan frið.

(Niðurlag)

(Les eisini Jóh. 6:40; 11:11, 43; Ják. 4:14.)

Sangirnir í stavrað

Ber gleðiboðini 66
Ber nú boð! 67
Bið til Jehova hvønn dag 47
Bíblian – innblást av Gudi 98
Bjóðar tú tína hjálp? 84
Boða sannleikan um ríkið 72
Bók Guds – ein dýrgripur 96
Brøður í túsundatali 99
Børn eru gáva frá Gudi 134
Dag um dag liva vit við Jehova 48
Dømið um, hvat beinast er! 35
„Eg geri alt nýtt!“ 146
Eg vil ganga røttu leið 34
Eg vil tæna Jehova av allari sál míni 37
Eginleikar Jehova 1
Ein sangur um gleði 111
Ein serstøk ogn 25
Ein sigursongur 149
Ein takkarbøn 43
Elskið hvørt annað av hjarta 109
Faðir mín, Gud mín og vinur mín 30
Fá tær gott navn hjá Gudi 39
Finn tey, ið eru tað verd 70
Framá tit, ið bera boð um ríkið! 69
Framá, tit vitni! 61
Friðurin frá Gudi 113
Fyrigevið 130
Ger framstig! 65
Gev okkum dirvi 73
„Gev okkum meiri trúgv“ 118
Gleð hjarta Jehova! 49
Gleði um Guds orð 94
Gleðin í Jehova 110
Gleðist tú? 76
Góðvild 117
„Grá hár eru vøkur krúna“ 138
„Gud er kærleiki“ 105
Gud gevur lærdóm 86
Gud skal rópa 151
Guds ríki hevur vald! 22
Guds tænari biður 42
Halt teg til Jehova! 32
Halt út til endan 128
Hann skal styrkja teg 38
Heilagi andin – gáva frá Gudi 104
Her er lívsins leið 54
„Her eri eg – send meg!“ 75
Himmalin kunnger dýrd Guds 6
Hirðar eru gávur 103
Hoyr, akta og fá signing 89
Hoyr mína bøn 41
Hugsanir hjarta míns 45
Hús úr húsi 83
Hvønn harra hevur tú? 40
Hvør er tín vinur, Gud? 28
Inniliga áheitanin frá Jehova: „Ver vísur, sonur mín!“ 135
Jehova eitur tú 2
Jehova er hirði mín 4
Jehova er kongur okkara 9
Jehova er skjól 148
Jehova er styrki okkara 7
Jehova er verja okkara 8
Jehova gevur fulla løn 136
Jehova, Gud friðarins 112
Jehova hevur ræðið 23
Kasta byrðu tína á Jehova! 33
Kom, hugsa tær! 139
Kom og syng um ríkið! 74
Kom og verð styrktur! 87
Komið glað við út at heysta 64
Komið niðan á fjall Jehova! 24
Kristin vígsla 52
Kristus er okkara fyrimynd 13
Kvøldmáltíð Harrans 19
Kærleikans leið 107

Latið ljósið skína 82
Latið okkum menna kærleikan 106
Leita eftir friðarvinum 58
Liv við Gudi! 31
Lívið sum pionerur 81
Ljós í myrkrinum 77
Ljósið skínur bjartari 95
Lovsyngið Jah! 59
Lyfti Guds um eitt paradís 145
Lyftið um ævigt lív 147
Lær meg tín veg 88
Lær tey at halda á 79
Lær tey Guds orð 78
Minst til tína ævigu løn! 144
Mín vígslubøn 50
Okkara kærleiksverk 91
Okkara trygga og fasta vón 142
Okkum tørvar Guds orð 97
Óttast ei! 55
Prísið Jehova, Gudi okkara! 10
Prísið øll Guds syni! 15
Røsk og árvakin skulu vit bíða 143
Sáa sáð ríkisins 68
Sig takk fyri salvaða kongin 16
Signa okkum, nú vit savnast 93
Skapanarverkið ber Gudi prís 11
Smakkið og síggið,
at Jehova er góður 80
Stóri Gud okkara, Jehova 12
Styrkið hvørt annað 90
Syngið nýggjan song! 62
Synir Guds opinberast 27
Søk Gud, og hann skal verja teg 150
Søkið altíð fyrst Guds ríki! 21
’Tað, Gud hevur bundið saman’ 131
Tað stendst um lív 60
’Tað vil eg’ 17
Tak eftir mildleika Kristusar 120
’Takið tykkum av hinum veiku’ 102
Tann niðurboygdi biður 44
Tann, sum tú vilt, eg skal vera 127
Tey miskunnsomu eru sæl 125
Til reiðar at boða 53
Tilbið Jehova í ungdóminum! 133
Tit gjørdu mær væl 26
Trúfastar kvinnur, kærar systrar 137
Trúfasti kærleiki Guds 108
Trúføst í øllum 124
Trúføst undir Guds skipan 123
Tú ert styrkin og vónin, vit líta á 3
Tú gavst tín kæra son 20
Tænið saman í einleika 101
Undurfulla tol Guds 115
Undurfullu verk Guds 5
Undursama lívið 141
Varða hjartað! 36
Vel sannleikan 56
Verið blíð og góð 116
Verið gestablíð 100
Verið tolin 114
Verið vakin, føst og mennist! 126
Vit bera navn Guds honum til prís 29
Vit bygdu navni tínum hús 92
Vit eru eitt 132
Vit eru lið Jehova 71
Vit halda út við gleði 129
Vit mugu hava tamarhald 121
Vit mugu hava trúgv 119
Vit mugu øll standa stinn! 122
Vit takka fyri loysigjaldið 18
Vit takka tær, Jehova 46
Vit vitna fyri øllum menniskjum 57
Vit vitna um Jehova 63
Vit víga Jehova alt 51
Vælkomin øll! 85
Ærið jarðarinnar nýggja kong! 14
Ævigt lív – umsíðir! 140